Avbyrging er hættislig
– vit mugu finna okkara pláss
í europeiska samstarvinum



JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

# JA til Evropa

# Ja til Evropa

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

# Ja til Evropa

## Avbyrging er hættislig
## – vit mugu finna okkara pláss
## í evropeiska samstarvinum

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

Umslag og umbróting:..........Grafikmaster / Kári við Rættará
Prent: ............................................GP-Tryk, Danmark
Útgevari:......................................Javnaðarflokkurin á Fólkatingi 2013

# INNIHALDSYVIRLIT

**Formæli** ........ 12

**Avbjóðingin, sum eingin vil taka á seg** ........ 12
Danmark, Danmark, Danmark, Danmark... ........ 14
Forðingar og fordómar ........ 15
Bygnaður ........ 17

**1. Partur – Fordómar, veruleiki og møguleikar** ........ 18

**ES er gott – ikki ónt** ........ 18
Ræðandi alternativ ........ 19
Demokratiska undirskotið er ikki so stórt ........ 21
Detaljustýringin – misnýtt, men neyðug ........ 22
USA sær vandan ........ 23

**Fiskivinnupolitikkurin er ikki fastlæstur** ........ 25

**Ikki bara ein klubbi fyri statir** ........ 27
Kommissiónin ........ 29
Parlamentið ........ 31
ES-Ráðið ........ 33

**Loysing krevur samband** ........ 36

**Formligt fullveldi – men lítið sjálvræði** ........ 38

**EFTA og EBS – ein leið sum ongan veg førir** ........ 39

**Tað ber til at fáa undantøk** ........ 40
Arktis gevur Føroyum sterka samráðingarstøðu ........ 40

**Føroysk stjórnarskipan vantar** ........ 42

**Vit mugu vita – ikki gita** ........ 44

**2. partur – Føroyskt nei til Evropeiska Felagsskapin** ..... 46

**Kjakið** ..... 48

**Embætismannanevndin** ..... 53

**Andstøða móti samgongu** ..... 54

**Samráðingarnar** ..... 56

**Løgtingið sigur nei til føroyskan EF limaskap** ..... 58

**3. partur – Áland í ES** ..... 60

**Áland valdi innara vegin** ..... 60

**Samráðingarnar** ..... 62
- Undantøkini ..... 62
- Skattaundantakið ..... 64
- Heimarætturin ..... 66

**Óvæntaðar avleiðingar** ..... 67
**ES og ávirkan** ..... 68
**Álendski samleikin** ..... 69

**4. partur – Ísland á vegamóti** ..... 70

**Íslendska kósin fær stóran týdning fyri Føroyar** ..... 70

**Almennu grundgevingarnar** ..... 71

**Argument fyri og ímóti** ..... 72
- Fortreyt fyri útlendskum íløgum ..... 73
- Gjaldoyra-eftirlit ..... 74
- Fiskivinnan ..... 75
- Landbúnaðurin ..... 76
- Hvalaveiða ..... 77

**ES-limaskapur – demokratiskur ella ódemokratiskur?** ... 77

**Hvørji áhugamál hevur ES?** ... 80

**Útlitini** ... 81

**Týdningur fyri Føroyar** ... 82

## 5. partur – Grønlendsku royndirnar ... 83

**Grønland við Danmark í EF** ... 83
Royndirnar við fiskiskapinum ... 84

**Grønland meldar seg úr EF** ... 86
OCT-limaskapur og nýggj fiskivinnuavtala ... 87
Hvat hildu flokkarnir? ... 88

**Grønland og ES - nýggj fiskivinnuavtala, nýtt samstarv** ... 88

**OLT - søguliga gongdin** ... 89

**Føroyar fara aðra leið** ... 90

## Notur ... 91

# FORMÆLI

## Avbjóðingin, sum eingin vil taka á seg

Í 2010 kom ein kanningarnevnd, sett av landsstýrinum, við enn einum áliti um, hvussu vit kunnu skipa samstarvið millum Føroya og ES. Bókin var gul, og fekk heitið Gula Álitið.

Meðan bólkurin arbeiddi fingu vit løgtingslimir eitt spurnablað, har vit skulu siga hvat vit hildu um ymisk viðurskifti. Hetta fyri at bólkurin skuldi kenna politiska viljan og vita, hvat hann skuldi leggja dent á. Men næstan ongin svaraði. Bólkurin fekk altso einki signal frá teimum, sum hava valdið.

Tí settu høvundarnir sjálvir nakrar møguleikar upp, og mettu leysliga um hvørjir fyrimunir og vansar vóru við hvørjum teirra: 1) At víðka verandi samstarv, 2) at lima Føroyar inn í ES gjøgnum Danmark, og 3) at lima Føroyar inn um sjálvstøðugan stat, og 4) at gera Føroyar til part í EBS-sáttmálanum.

Gula Álitið bleiv lagt fram á Hotel Hafnia, og seinni var orðaskifti um tað á tingi. Men tey fæstu høvdu lisið álitið, og kjakið var tamt. Einki greitt, politiskt sjónarmið var at hoyra, men hugsanin tóktist vera, at vit skuldu miðja móti EFTA-limaskapi og einum EBS-sáttmála við ES. Tað er henda skipan, sum Ísland og Noreg hava. Stóri fyrimunurin er, at samstundis sum hon ger londini til part av innara marknaðinum í ES, loyvir hon teimum at hava egnan fiskivinnupolitikk. Men í 2010 høvdu skiftandi landsstýri longu roynt at ganga hesa leið – og rent seg føst. Onnur EFTA lond vilja ikki hava Føroyar við, og juridiskt er tað sera fløkt tí vit ikki eru eitt fullveldisríki.

Tað er rættiliga undrunarvert, at so lítið kjak er um ES í Føroyum. Tí okkara verandi støða er eitt samfelagsligt vandamál. Í Gula Álitinum vísir Vinnuhúsið t.d. á hesar trupulleikar við verandi skipan:

- Føroyingum stendur frítt at fara á opnu arbeiðsmarknaðirnar kring okkum – men torført er hjá útlendskari arbeiðsmegi at sleppa til Føroya. Avleiðingar eru lønarglíðing og versnandi kappingarføri. Vinnulívið heldur tað vera eina avgerandi fortreyt fyri menning av føroyskari vinnu, at fræls atgongd fæst til arbeiðsmegi.
- Alivinnan hevur verið rakt av ákærum um dumping, sum hava verði sera dýrar. Roknast kann við, at tær verða afturvendandi – og vinnan heldur ikki, at tað í longdini ber til at liva við hesum vanda.

- Orsøkin til at sílaframleiðslan er steðgað, er kanska júst at Føroyar hava verið dømdar fyri dumping.
- Tað økir um útflutningskostnaðin, at okkara vøra ikki hevur ES-stemplið, men at serstøk heilsufrøðilig- og tollskjøl skulu fylgja við øllum útflutningi til ES.
- At vit hava kvotur á útflutningi til ES skerjir møguleikarnar fyri at menna útflutningsvinnuna sum heild.
- At vit hava ein lista við vørum, sum vit kunnu flyta tollfrítt til ES – ein "positivlista" – forðar fyri menning av nýggjari føroyskari vinnu.
- Tað skerjir møguleikarnar hjá føroyskum fiskaframleiðarum, at teir ikki – eins og virki í ES – kunnu keypa og virka triðjalandsfisk og selja hann tollfrítt í ES.
- Verandi støða forðar fyri menning innan landbúnaðin. ES-lóggáva og ES-skipanir kundu lyft framleiðsluna upp á eitt hægri stig.
- Føroyar hava sum er ikki atgongd til stuðulsskipanir, sum eru gjørdar fyri útjaðarar.
- Verandi støða avmarkar møguleikarnar hjá føroyskum tryggingarfeløgum at virka í ES-londunum.
- Tað kann forða menningini av føroyskari vinnu, at fríur flutningur av tænastum ikki er millum Føroyar og ES. Eitt nú shippingvinnan heldur at stórir menningarmøguleikar verið, um hetta fekst í lag.
- Føroyar eru "serstakliga útsettar, um ES í framtíðini fer at føra ein meira verjukendan politikk".

Men hetta fekk ongan politikara at ressast. Gula Álitið fór í eina skuffu.

Í 1991 kom ein líknandi útgáva – Ljósareyða Álitið. Har varð beinleiðis sagt, at tað besta fyri Føroyar helst var at fáa ein EBS-sáttmála við ES. Men tað var ringasta krepputíð, og eingin tosaði um okkara viðurskifti við ES.

Í 1995 kom Bláa Álitið. Har varð ávarðað um, at Føroyar fóru at standa isoleraðar uttanfyri handilsligu samansjóðingina í Evropa. Tí varð mælt politikarum til at stremba eftir antin at fáa ein EBS-líknandi sáttmála og tollsamgongu við ES ella at gerast ES-limir umvegis Danmark. Samstundis ásannaðu høvundarnir, at hetta fór at verða trupult, m.a. orsaka av, at viðurskiftini millum Danmark og Føroyar fóru at gerast avgerandi partur av málinum.

Onnur mundu eisini halda hetta vera trupult, tí kjak bleiv heldur ikki um Bláa Álitið.

Í 1998 kom so Reyða Álitið. Har bleiv sagt, at ein EBS-líknandi skipan saman við eini tollsamgongu við ES hevði verið nøktandi fyri Føroyar. Men samstundis bleiv ásannað, at skuldu vit fáa hetta, máttu vit helst lata ES veiðirættindi í føroyskum sjógvi afturfyri. Aftur ein trupul støða – og lítið kjak.

Einasta leið føroyskir politikarar hava roynt, er at lima Føroyar inn í EFTA fyri tann vegin fáa ein EBS-sáttmála við ES. Tað hevur kortini ikki borið nakran veg, og ætlanin tykist nú vera slept.

Í ES- og EBS-londunum hava vørur, tænastur, fólk og kapitalur frítt at fara. Hesi "fýra frælsini" gera tað lættari at virka – men Føroyar standa isoleraðar uttanfyri renslið. Vit hava ein handilssáttmála, sum gevur ávísum, lítið virkaðum fiskavørum at kalla fría atgongd til ES marknaðin. Hann er rímiliga nøktandi fyri tann útflutning sum er í dag, men avmarkar hvussu okkara vinna kann mennast framyvir. Harumframt liva vit í støðugum vanda fyri, at ES strammar sín politikk ella t.d. ákærir okkum fyri dumping.

Við ES-limaskapi hevði føroyskt vinnulív frítt kunna útflutt til allan evropeiska marknaðin við 500 milliónum fólkum, sum umboða 20% av heimsins tjóðarinntøku. Og ES hevði okkara vegna gjørt avtalur við aðrar marknaðir - t.d. USA, Kina og Japan. Avtalur, sum tað er sera trupult hjá okkum at fáa einsamøll.

## Danmark, Danmark, Danmark, Danmark...

Men tað eru ikki bara vinnuligar og búskaparligar avleiðingar av, at vit standa uttanfyri. Tað eru eisini avleiðingar av meira politiskum og mentanarligum slag. Ein av teimum er, at Danmark fyllir alt ov nógv í høvdinum á okkum øllum.

"Danmark, Danmark, Danmark, Danmark, Danmark". Soleiðis segði Høgni Djurhuus í eini av sínum frálíku "klummum" í útvarpinum, hvørja ferð hann samanbar okkurt í Føroyum við okkurt í Danmark.

Hann nevndi ikki Danmark oftari enn vit vanliga gera í Føroyum – ramsan gjørdi tað bara týðuligt *hvussu* ofta vit sipa til Danmark í dagligari talu.

Danmark er øgiliga stórt í hugaheimi føroyinga. Tað fyllir næstan allan sjónarringin. Og vit fylgja ikki bara væl við tí, sum hendir í Danmark – tað, vit hoyra úr øðrum londum, hoyra vit eisini ofta umvegis danskar fjølmiðlar.

Tá ein flytur úr Føroyum til Danmarkar hendir tað løgna, at Danmark minkar. Nú

er umheimurin onnur lond, sum næstan ikki síggjast úr Føroyum. Og tá føroyingar so flyta til onnur, størri lond – ja, so hvørvur Danmark næstan heilt... Tástani geva vit okkum far um, hvussu lítið Danmark er – og hvussu nógv størri tað er í okkara hugaheimi, enn tað er í veruleikanum.

Tá uppskotið sum m.a. skal loyva ES at seta tiltøk í verk móti Føroyum fyri makrelfiskiskapin var fyri í 2012, kom eg sum fólkatingsmaður undir eitt ávíst trýst. Eg kundi jú ikki liva við tí, um Danmark tók undir við ES-meirilutanum. Men kjakið sum tá var vísti rættiliga væl, hvussu stórt føroyingar halda Danmark vera: Fleiri tóktust halda, at um eg bara fekk Danmark at vera ímóti, so kom uppskotið ikki ígjøgnum...

Veruleikin er, at danska fólkið er 1% av fólkinum í ES, og at danir bert eiga ein evarska lítlan part av atkvøðunum í ES-Ráðnum og ES-Parlamentinum. Men í høvdinum á nógvum føroyingum er ein heilt onnur mynd: Danmark er risastórt.

Orsøkin er sjálvandi, at vit hoyra til ríkisfelagsskapin. Men man ein onnur orsøk ikki vera, at vit standa uttanfyri næstan allar aðrar politiskar felagsskapir?

Hyggur ein at fjølmiðlamyndini í Føroyum, so sæst skjótt, at viðgerðin av uttanlands-tíðindum er sera avmarkað. Vit skriva og lesa og tosa nógv mest um okkum sjálv og okkara egnu, lítlu verð. Á løgtingi kemur næstan ikki fyri, at uttanlandsmál eru til umrøðu.

Vit hava snøgt sagt lyndi til at lata okkum aftur um okkum sjálv. Tað er ikki sunt - og ein orsøk til tað mann vera, at vit eru so lítið við í altjóða samstarvi.

Tá vit fingu altjóða limaskap í ymiskum sersambondum innan ítrótt – ikki minst fótbólt – lótu vit dyrnar til altjóða samstarv upp tann vegin. Sjónarringurin gjørdist víðari og heimurin gjørdist størri. Hann endaði ikki longur í Danmark.

Eg rokni við, at ES-limaskapur hevði havt somu ávirkan, tá tað snýr seg um onnur øki. Ferðavinna og onnur vinna, politikkur, útbúgving, mentan – tað hevði alt fingið gagn av, at vit gjørdust partur av einum størri høpi. – Hóast tann hurðin, vit fóru inn ígjøgnum, var Danmark.

# Forðingar og fordómar

Orsøkin til, at so lítið verður tosað um okkara tilknýti til ES, er ikki at støðan er nøkt-andi. Tað er hon, sum Vinnuhúsið hevur víst á, langt ífrá. Orsøkin til tøgnina er, at hetta er eitt trupult kjak. Í staðin fyri at taka tað upp, verður høvdið stungið í sandin.

Og so eru nakrar hugsanir, sum standa sterkar í Føroyum, ið gera, at kjakið altíð læsist fast áðrenn tað er byrjað – við tí úrsliti, at eingin broyting hendir. Tað, sum læsir kjakið, eru í høvuðsheitum hesar fatanir:

- ES er ónt. Tað er eitt stórt, ódemokratiskt, bureaukratiskt og afturlatið samveldi, har tey stóru ráða. Tað er til fyri at tæna stórkapitalinum. Tí er tað ikki nakað fyri Føroyar.
- Felags ES-fiskivinnupolitikkurin er ein katastrofa. Hann verður ikki broyttur – og við limaskapi høvdu føroyskar fiskileiðir komið undir ES-ræði.
- ES er ein klubbi fyri statir. Okkara ríkisrættarliga støða ger, at Føroyar ikki kunnu gerast limir á jøvnum føti við onnur lond, men mugu gera tað gjøgnum Danmark. Skulu vit gerast ES-limir, mugu vit hava loysing fyrst.
- Tað verður ógjørligt at fáa loysing frá Danmark um vit gerast ES-limir í verandi støðu, tí tá fara vit at hava tveir mótpartar - bæði Keypmannahavn og Brússel.
- Við limaskapi høvdu Føroyar horvið sum land, og føroyingar horvið sum tjóð. Vit høvdu endað uttan egnan samleika sum ein danskur landslutur, har ES-reglur høvdu tikið av rættin til okkara egnu mentan og siðvenju – t.d. at veiða fugl, at fletta seyð og drepa grind.
- EFTA-limaskapur og ein EBS-avtala høvdu givið okkum alt tað, okkum tørvar. ES-limaskapur er ikki neyðugur.

Okkurt av hesum er rætt. Okkurt er skeivt. Tað mesta vita vit ov lítið um. Og hvat vit so gera, verður tað trupult at finna eina góða loysn.

Men tað er tekin um politiskt leti og ábyrgdarloysi, at vit lata eygu og oyru aftur, leggja ES-álit eftir ES-álit í skuffurnar uttan at tora at umrøða tey – og tíansheldur taka nakra støðu.

Ein uppgáva hjá politikarum er at seta trupul, men týðandi mál á dagsskrá, og líkasum bróta ísin. At taka við uppgávuni, heldur enn at renna undan henni. At bjóða sær sjálvum og øðrum av í opnum kjaki.

Hetta rit er ein roynd at seta fokus á møguleikar og vansar við føroyskum ES-limaskapi. Ikki bara við objektivt at lýsa fakta, men at leggja fram politisk sjónarmið, sum fólk kunnu taka støðu til. Eg veit at nógv eru ósamd - men so vóni eg at tey siga *hví* tey eru ósamd.

# Bygnaður

Í fyrsta parti verður hugt nærri at teimum omanfyrinevndu hugsanum, sum altíð forða fyri, at kjakið um føroyskan ES-limaskap kemur í gongd. Hetta er tann mest politiski parturin, og eg havi skrivað hann.

Annar partur er ein lýsing av politisku gongdini sum førdi til, at Føroyar valdu at standa uttanfyri Evropeiska Felagsmarknaðin, tá Danmark fór inn í 1973. Hetta er ikki bara áhugaverd politisk søga – vit kunnu eisini læra nógv av tí, sum hendi tá. Tað er Joan Ólavsdóttir, sum hevur skrivað hendan partin.

Triði partur er ein lýsing av viðurskiftunum millum Áland og ES. Hesin parturin byggir á samrøður við politikarar, embætisfólk og vinnulívsfólk í Álandi, sum eg saman við starvsfólkum gjørdi á eini vitjan í Álandi í 2012. Støða Álands minnir um støðu Føroya, og tí eru teirra royndir viðkomandi fyri okkum. Eirikur í Jákupsstovu, hevur skrivað hendan partin.

Fjórði partur er ein lýsing av íslendska ES-kjakinum. Hann byggir á samrøður sum eg, undir eini vitjan í Íslandi í 2012 saman við starvsfólkum, gjørdi við umboð fyri allar politisku flokkarnar í Íslandi, nevndina sum samráðist um íslendskan ES-limaskap, og við serfrøðingar frá universitetinum í Reykjavík. Hetta er viðkomandi fyri okkum, bæði tí Ísland er grannaland, tí teirra avbjóðingar í mongum førum eru tær somu sum okkara, og tí teirra avgerðir fara at ávirka okkara støðu og okkara møguleikar. Eg havi skrivað hendan partin.

Fimti partur lýsir støðu Grønlands til ES. Hetta er viðkomandi bæði tí vit eru í sama ríki, og tí Grønland hevur royndir, sum vit ikki hava, men sum vit kunnu læra av. Birita í Dali hevur skrivað hendan partin.

Tey, sum hava starvast hjá Javnaðarflokkinum á Fólkatingi meðan arbeiðið er gjørt, hava verið Joan Ólavsdóttir, Eirikur í Jákupsstovu, Birita í Dali og Elisabeth F. Rasmussen. Men tað er eingin politisk binding í at arbeiða fyri Javnaðarflokkin á Fólkatingi, og starvsfólkini hava bert arbeitt fakliga og journalistiskt. Tey hefta ikki fyri tær politisku meiningarnar í bókini.

Farið varð undir at gera hetta kjakupplegg um Føroyar og ES í samráð við leiðslu Javnaðarfloksins, sum fegin vildi hava varpað betri ljós á hesa avbjóðing. Politisku sjónarmiðini í bókini eru kortini ikki almennu sjónarmið Javnaðarfloksins. Øll eru míni sjónarmið, eins og eg havi ábyrgdina av øllum mistøkum.

*Sjúrður Skaale*
*Fólkatingsmaður*

# 1. PARTUR

# Fordómar, veruleiki og møguleikar

## ES er gott – ikki ónt

Tá løgtingið fyrst í sjeytiárunum skuldi taka støðu til, um Føroyar skuldu fara við Danmark inn í Evropeiska Felagsmarknaðin, birtist ein tann størsta politiska rørsla, sum hevur verið í Føroyum: Fólkafylkingin móti EEC (sí annan part).

Fylkingin - væl stuðlað av serliga Tjóðveldisflokkinum - førdi eina kampanju, ið lýsti felagsmarknaðin sum nakað stórt, fremmant og rátt, ið fór at týna Føroyar, gjørdust vit limir.

Ein tekning hjá Williami Heinesen brendi seg seinni inn í sinnið á fólki. Hon lýsir EEC sum ein stóran grip, ið etur smáu londini í norði. Á tekningini er Danmark tikið - og Føroyar eiga skjótt tørn at fara niður í tann glúpska kjaftin.

*Myndin hjá Williami Heinesen,*
*sum brendi seg inn í sinnið*
*á nógvum føroyingum undir*
*EF-kjakinum í sjeytiárununum.*
*Framin nr. 5-6 1976*



Fyri nógvar føroyingar hevur hetta verið myndin av fyrst Evropeiska Felagsmarknaðinum (EF) og síðani Evropeiska Samveldinum (ES): Tað er ein stórur, ódemokratiskur felagsskapur, har tey stóru ráða, og tey smáu verða týnd.

Hetta samsvarar illa við hugsanina hjá norsku Nobelnevndini, sum í 2012 lat ES friðarheiðurslønina. Í hennara grundgevingum varð m.a. sagt, at ES í yvir seks áratíggju hevur virkað fyri friði, fólkaræði og mannarættindum í Evropa.

Nevndin vísti á, at áðrenn seinna heimsbardaga høvdu Týskland og Frakland, í eitt 70 ára skeið, verið í kríggi tríggjar ferðir. Í dag er kríggj millum hesi londini óhugsandi. Teir søguligu fíggindarnir eru nú felagar, takkað verið tí tvívegis áliti, sum er bygt upp gjøgnum ES.

Eisini tók Nobelnevndin fram, at ES hevur slóðað fyri fólkaræði. Ikki minst í Suður- og Eysturevropa er demokratiið styrkt, og fleiri stríð millum etniskar bólkar eru loyst á friðarligan hátt.

Samanumtikið hevur ES, sambært Nobelnevndini, stabiliserað Evropa, og broytt tað frá at vera ein heimspartur, sum var merktur av kríggi, til at vera ein heimspartur, har friður valdar.

## Ræðandi alternativ

Nobelnevndin hevur rætt í hesum. Tað hevur gjørt kríggj nærum óhugsandi at múrarnir millum londini í Evropa eru tiknir burtur, so heimsparturin í dag er ein og sami marknaður og londini í nógv størri mun enn fyrr eru bundin hvørt at øðrum.

ES fungerar ikki altíð so væl, sum ein kundi hugsað sær, og fleiri lond í samveldinum hava í løtuni ovurstórar trupulleikar av bæði búskaparligum og politiskum slag - men alternativið til tað tætta, bindandi samstarvið í ES er verri. Hóast londini í Evropa eru ymisk, eru tey í einum lagnufelagsskapi, har tað uppá allar mátar er ein fyrimunur at knýta seg tætt saman. Hvørt land sær hevði neyvan verið betur fyri um ES ikki var, og sterku londini tí høvdu havt nógv minni orsøk at hjálpa teimum veikaru.

Hugsa vit meira globalt og strategiskt er heldur eingin ivi um, at ES er neyðugt. Skal Evropa – politiskt, búskaparliga, hernaðarliga, mentanarliga - standa seg millum stóru aktørarnar á heimspallinum í framtíðini og seta sín dám á heimsins gongd, so er alneyðugt, at tey nærum 30 londini verða samskipað á so nógvum økjum sum gjørligt. Í mun til tey stórveldi, sum í dag vaksa fram og mennast, eru øll evropeisku londini fáment. Um ES datt sundur, hevði leikluturin og ávirkanin hjá Evropa fánað nógv.

Hyggja vit bert at fólkatalinum, er størsta evropeiska landið – Týskland – á 16. plássi í heiminum. Bara í India og Kina búgva fimm ferðir so nógv fólk sum í øllum 27 ES-londunum tilsamans. Sannlíkt er, at um fá ár kann einki einstakt evropeiskt land vera partur av G8-bólkinum, sum er felagsskapurin hjá átta teimum búskaparliga sterkastu londunum í heiminum. Lond sum Kina, USA, Russland, India, Brasilia, Mexico, Japan, Indonesia og kanska onnur við fara hvørt sær helst at verða sterkari enn øll tey evropeisku londini. Og fleiri av hesum verandi og komandi stórveldum umboða sum kunnugt ikki tey virði, sum Evropa byggir á.

Londini í ES eru rættiliga fjølbroytt – bæði søguliga, politiskt, vinnuliga, búskaparliga, mentanarliga og religiøst. Men tað er eisini sera nógv sum knýtir saman. Øll evropeisk lond hava meira til felags hvørt við annað enn tey hava við t.d. Saudi Arabia ella Kina. Og tey virði, sum ES byggir á – sum eru feld niður í sáttmálar og lógarverk – standa veik nógva aðrastaðni: Fólkaræði, rættartrygd, talufrælsi, javnstøða millum menn og kvinnur, skilnaður millum religión og politikk, umhvørvisvernd, frælsi hins einstaka og fríur, men reguleraðan marknaður.

Hvørt sær kunnu londini ikki verja hesi virði. Globaliseringin verður støðugt meira umfatandi. Landamørk missa týdning. Tað ber snøgt sagt ikki til at føra politikk, um hann ikki røkkur um landamørk. Týðiligast er tað innan umhvørvispolitikkin. Tað gevur als onga meining at verja umhvørvið, um grannin ikki eisini ger tað. Og um vit ikki hava ein yvirskipaðan myndugleika, sum kann leggja fleiri lond undir somu




*Ofta hugsa vit ikki um, hvussu smá evropeisku londini eru í heimshøpi.*




treytir í senn – so leggur *einki* land seg undir treytirnar. Eingin vil tapa búskaparligu kappingina við at leggja á seg bindingar, sum grannin sleppur undan. Og ES verjir ikki bara umhvørvið í Evropa. Tað snýr seg eisini um at breiða evropeisk virði út um heimin. Uttan ES kom eingin Kyoto-avtala – bara fyri at taka eitt av mongum dømum.

Sama er galdandi innan reglur á arbeiðsmarknaðinum, arbeiðsumhvørvi, rættindi hjá arbeiðarum, brúkaravernd og mong onnur øki.

Tað er ikki "stórkapitalurin" sum stýrir ES, sum tað mangan verður sagt. ES er tvørturímóti einasta vón fyri einum Evropa, sum ikki verður stýrt av fyrilitarleysum marknaðarkreftum. Tað er bara um londini geva seg undir ein felags politiskan myndugleika, at hetta ber til. Lyfta vit ikki í felag, lyfta vit ikki yvirhøvur.

At evropeisku londini standa saman og – samstundis sum tey hvørt sær varðveita egnan samleika – royna menna eitt evropeiskt stórveldi, sum kann umboða nevndu virði í heiminum, er alneyðugt.

## Demokratiska undirskotið er ikki so stórt

ES umboðar ikki altíð áðurnevndu evropeisku virði nóg væl. Hvørki tá tað snýr seg um at leggja trýst á t.d. Russland og Kina ella inneftir í ES sjálvum. Í summum limalondum henda eisini ting, sum ikki áttu at kunnað hent í einum felagsskapi, sum byggir á rættartrygd. Vit hava hoyrt um korruptiónsgølur í ES, um ábyrgdarleysa

penganýtslu - og sjálvur kenni eg eitt sindur til viðurskiftini í Spania, har hundraðtals baskar sita fongslaðir fyri virksemi, sum í mongum førum ikki kann kallast annað enn politiskt.

At eitt ávíst "demokratiskt undirskot" er í sjálvari ES-skipanini, verður ofta eisini tikið fram. Orsøkin er, at ES-Kommissiónin, sum ikki er fólkavald, hevur ov nógv vald í mun til ES-Parlamentið.

Tað er lutvíst rætt, men trupulleikin er kortini ikki so stórur, sum hann verður gjørdur. Tað eru hóast alt demokratiskt valdar stjórnir, sum útnevna kommisserarnar – og ES-Parlamentið skal góðkenna teir. Í veruleikanum er tað eisini ein tryggleiki, at Kommissiónin, sum ikki skal umboða limalondini men ES sum heild, framvegis hevur mesta valdið. ES er framvegis í eini gongd har samveldið verður skipað og samansjóðað, og tí er neyðugt við eini ávísari topp-stýring.

Og hugsa til dømis um hvat hevði hent, um ES-Parlamentið og ES-Ráðið høvdu havt tað avgerandi orðið í spurninginum um tiltøk móti Føroyum í makrelmálinum. Tiltøkini høvdu verið sera hørð – og tey høvdu verið sett í verk í ár! Tað var Kommissiónin – sum ikki kann leggjast undir beinleiðis politiskt trýst – sum fyrst gjørdi at instrumentið bleiv avmarkað, og síðani segði, at grundarlag ikki var fyri tiltøkum yvirhøvur í ár.

Tá tosað verður um "demokratiskt undirskot" í ES gloyma fólk viðhvørt eisini, at demokrati í hvørjum landi sær mangan onga meining gevur. Tað eru so nógv viðurskifti, sum bara kunnu loysast í felagsskapi, at tað veruliga demokratiska undirskotið hevði verið, um einki ES var. Tí so høvdu vit einki kunnað gjørt við eina langa røð av vandamálum.

Tað hetta er sagt, so haldi eg sjálvsagt, at ES-Parlamentið sum frá líður eigur at fáa størri heimildir.

## Detaljustýringin – misnýtt, men neyðug

So er tað stýringin av vinnuligum virksemi. Í Føroyum kenna vit alt ov nógv dømi um, at ES-reglur seta vanligt vit og skil til viks, og um at ES-skipanin tekur atlit til egið vinnulív fram um objektiv, saklig atlit. Hesi dømi kunnu nevnast:

- Sáttmálin við ES noyðir føroyingar at geva seg undir reglur innan matframleiðslu og -servering, ið mangan tykjast vitleysar.

- ES hevur í langa tíð – uttan nakra vísindaliga grundgeving – noktað føroyskum saltfiskaframleiðarum at nýta fosfat í framleiðsluni. Við stórum fíggjarligum missi sum avleiðing.
- Føroyskir laksaútflytarar eru vorðnir ákærdir fyri dumping uttan sakliga grund.
- Í sambandi við stríðið um makrelkvoturnar hevur ES misnýtt tað vald, ið liggur í tess støðd, til at tvinga sær ein størri part av kvotuni enn tað, sum samveldið geografiskt / biologiskt eigur rætt til.
- Sum tað sæst í partinum um Áland er tey eisini har misnøgd við nøkur viðurskifti. Hví skal ES t.d. banna sølu av snúsi í Álandi, tá tað er loyvt í Svøríki? Og hvar er logikkurin, tá tað samstundis er loyvt at selja hash í Hollandi?

Hetta hongur ikki saman. ES fer stundum ov langt, og má læra at skilja millum tað, sum hevur týdning, og tað, sum ikki hevur týdning.

Men eisini her eiga vit at minnast til, at hóast stýringin fer ov langt, so er tað ikki skeivt, at tað eru strammar reglur fyri matvøruframleiðslu í Evropa. Tær eru neyðugar – bæði fyri at tryggja javna kapping millum framleiðararnar í teimum ymisku londunum, fyri at forða djórapínslu og fyri veita brúkarunum trygd fyri, at maturin er í lagi. So einaferð enn: Yvirskipað stýring er ikki skeiv. Hon er neyðug. At hon stundum fer ov langt, og at tað stundum eydnast onkrum at misnýta stýringina til egnan fyrimun er ein onnur søk.

# USA sær vandan

Ónøgdin við tað sum ikki er nóg gott, má ikki hava við sær, at ES verður amputerað og gjørt so veikt, at tað til endans dettur sundur. Tí yvirskipað, strategiskt, heimspolitiskt er Evropeiska Samveldið er ikki bara gott – vilja vit Evropa og evropeisku virðunum væl, er ES neyðugt. Vegurin fram er at menna og styrkja ES – og harvið tey virði, sum eru feld niður í tess sáttmálar. Tá ein steinur er í skónum er at taka hann úr – ikki at tveita skógvin burtur.

At forkoma skónum er kortini tað, sum alsamt fleiri vilja. Farnu árini – serliga síðani fíggjarkreppan rakti – hava anti-ES rørslur í fleiri av londunum fingið stóra undirtøku.

Sum oftast eru hesar rørslur frá ytsta høgra- ella nationalistiska vonginum, men í Bretlandi er sjálv tann konservativa stjórnin hjá David Cameron vorðin fortalari fyri, at ES skal skerjast munandi, og at nógvar av heimildunum, sum latnar eru Brússel, skulu takast aftur undir bretskt ræði. Eydnast tað ikki, er Cameron til reiðar at taka



*Bæði evropeiskir og amerikanskir leiðarar óttast nýggju kósina hjá David Cameron.*

Bretland úr ES. Hetta fekk í januar í ár Obama-stjórnina at taka tað óvanliga stig at ávara bretsku stjórnina móti hennara egna politikki. Tí í Washington duga tey at síggja, at dettur ES sundur, so verður tað ein vanlukka – ikki bara fyri Evropa, men eisini fyri USA og heimin allan, sæð úr okkara sjónarhorni. Tey vesturlendsku virðini fara at standa veikari, meðan tað, sum er okkum fremmant, fer at standa sterkari.

Hóttanin, sum í dag er ímóti ES, mundi eisini vera høvuðsorsøkin til, at Nobelnevndin lat samveldinum friðarheiðurslønina júst í fjør. Nevndin vildi minna á, at hóast nógv er miseydnað, og hóast nógv ikki riggar sum tað skal - so er ES ikki ónt. Tað er bæði gott og neyðugt!

Teir aktuellu trupulleikarnir verða ikki loystir við at syndra ES, men við at styrkja tað, har tað skal styrkjast – og avtaka detaljustýringina, har hon bara er til fortreð.

Tá vit í Føroyum umrøða ES skulu vit sjálvandi hyggja at, hvussu ES ávirkar okkum, og hvussu vit fáa mest burturúr. Men vit eiga ikki at lata okkum aftur um okkum sjálv sum ein kræklingur. Vit eru partur av heiminum, og eiga eisini at hugsa um, hvat er best fyri heimin.

# Fiskivinnupolitikkurin er ikki fastlæstur

Hóast hon skapar trupulleikar í dag, so var tað ein røtt avgerð, sum løgtingið tók fyrst í sjeytiárunum: Tá tað ikki bar til at fáa eina nøktandi avtalu um fiskivinnuna, var ikki ráðiligt at fara inn í EF saman við Danmark (sí meira um hetta í 2. parti). Tær royndirnar, sum grønlendingar gjørdu (sí 5. part) – prógvaðu hetta.

Og tað var ikki bara sjálv avgerðin, sum var røtt. Mátin, avgerðin varð tikin uppá, var eisini rættur. Samgongan, sum tá sat, hevði eina pragmatiska tilgongd: *Fyrst* bleiv kannað hvør avtala kundi fáast, og *síðani* bleiv avgerðin tikin.

Tey, sum tá av ideologiskum orsøkum søgdu nei til limaskap áðrenn tey kendu treytirnar, tóku rætta avgerð. Tað vísti seg jú at vera rætt at siga nei. Men teirra mannagongd var skeiv.

Fyri tað fyrsta var felagsmarknaðurin ikki tað stóra, ónda djórið, sum hann bleiv gjørdur til. Fyri tað næsta mugu vit skilja, at í altjóða viðurskiftum mugu Føroyar fylgja við, og laga okkum til umstøðurnar á tann hátt, sum er gagnligast fyri okkum. Vit mugu finna okkara rók í skipanini – tað verða aldrin vit, sum skapa skipanina. Tá evropeisk lond gera av at samstarva, so mugu vit finna útav, hvar og hvussu vit kunnu vera við. Vit kunnu ikki steðga samstarvinum.

Og seta vit tær realistisku brillurnar á nøsina í dag, so síggja vit, at tað eru møguleikar fyri pragmatiskum loysnum, sum ikki vóru fyri 40 árum síðani.

Ein ábending um, hvørt tann fyri okkum so avgerandi spurningurin um fiskivinnupolitikkin er líka fastlæstur í dag sum tá, sæst í fjórða parti í hesum riti – partinum um Ísland. Eg skal ikki endurtaka tað sum har stendur – men lesarin sær beinanvegin, at íslendingar við teirra samráðingunum við ES føra okkara stríð. Allar tær góðu grundgevingar, sum teir føra fram fyri at fáa eina serskipan innan fiskivinnu, eru galdandi fyri Føroyar eisini.

Tað er sannlíkt, at tað fer at eydnast Íslandi at bróta ísin fyri okkum, so vit kunnu sigla aftaná. Eitt er, at teir hava góðar grundgevingar – men vit skulu eisini hava í huga, at Øssur Skarpheðinsson, uttanríkisráðharri, mestsum setti eina góða avtalu um fiskivinnuna upp sum eina treyt fyri at fara undir samráðingarnar. Hevði ES ikki verið til at vika, hevði samveldið neyvan farið undir tilgongdina.

Annars er at siga, at hóast fiskivinnupolitikkurin í ES vissuliga hevur verið miseydnaður, so hevur samveldið ikki læst seg fast á hendan sama politikk. Tað henda smáar broytingar alla tíðina – t.d. verða støðugt nýggj tiltøk sett í verk ímóti bæði ovfisking og útblaking. Og tað er eisini uppá tal at broyta politikkin soleiðis, at limalondini fáa nógv størri ræðisrætt – ið hvussu er tá umræður lokalar fiskastovnar.

Ferðandi fiskastovnar verða neyvan lagdir út til londini at umsita. Men tað hevði heldur ikki verið rætt. Tí við umsitingini av teimum er tað sum við dálking – er eingin yvirskipaður politikkur, so er eingin politikkur yvirhøvur.

Hóast vit í løtuni eru ónøgd við býtið, og hóast eftirlitið, sum ES hevur við egnum londum ikki riggar nóg væl, so er tað ikki ringt fyri t.d. pelagisku fiskastovnarnar, at ES samskipar samráðingarnar og fiskiskapin hjá samveldinum. Jú fleiri partarnir eru og jú veikari tann yvirskipaði myndugleikin er, jú truplari er at fáa eina bindandi avtalu og steðga ovfisking.

# Ikki bara ein klubbi fyri statir

Ein trupulleiki í kjakinum um støðu Føroya í altjóða samstarvi er, at vit viðhvørt ikki taka støði í eini sannroynd, sum er púra avgerandi fyri, hvat vit kunnu og ikki kunnu: Nevniliga at Føroyar eru eitt sera lítið land og føroyingar eru ein sera fáment tjóð.

Vit eru færri enn 50.000 fólk. Tað er ein grundtreyt, sum vit mugu hava í huga, tá vit tosa um okkara framtíðarstøðu.

Skulu Føroyar mennast, mugu vit á øllum økjum varðveita og styrkja okkara sjálvræði og okkara samleika so nógv, sum til ber. Men samstundis mugu vit gera okkum greitt, at eitt land við so fáum fólkum má vera partur av einum samstarvi. Bæði tá tað snýr seg um valuta, verjupolitikk, uttanríkispolitikk og mong onnur øki, yvirliva Føroyar bert sum framkomið samfelag, um vit eru partur av eini størri heild.

At tosa um at vit skulu "loysa" uttan samstundis at siga, hvørjum vit skulu vera partur av aftaná, er bæði veruleikafjart og ábyrgdarleyst.

*"Die Politik ist die Lehre vom Möglichen"* segði Bismarck. Tað ræður um at finna røttu javnvágina millum idealismu og realismu. Tað er lætt at vera idealistiskur – men idealisman einsamøll kann sjáldan umsetast til ein politikk, sum ber til. Tann, sum vil finna góðar loysnir í praksis, má eisini vera realistiskur.

Og samstundis sum vit gera okkum greitt, at vit mugu vera partur av eini størri heild, mugu vit ásanna, at eisini sum partur av einum størri felagsskapi eru vit fá. Og tað hevur altso nakrar avmarkingar.

Tað verður ofta sagt, at skulu Føroyar verða limur í ES, so hava vit valið millum at lima okum inn undir egnum navni sum sjálvstøðugt land – ella at fara inn "sum ein danskur landslutur".

Tað er ikki rætt at seta valið upp sum eitt sovorðið antin / ella. Tað finst ein meira realistisk millumleið – sí t.d. partin um Áland, sum vísir, hvussu umfatandi undantøk tað ber til at fáa. Eingin kann siga, at Áland í ES-høpi bara er ein finskur landslutur. Tað er tvørturímóti – Áland hevur sterkari samleika á altjóða pallinum sum ES limur enn landið hevði áðrenn limaskapin.

Men hetta koma vit aftur til seinni – her skal eg grundgeva fyri, hví sjálvstøðugur føroyskur limaskapur ikki er realistiskur, umrøða hvørjar vansar hetta hevur við sær, og hvussu álvarsamir teir eru.

Tá eg staðfesti, at Føroyar eru ov smáar til kunna umista egnan limaskap á jøvnum føti við onnur lond, so fara fleiri at kalla tað "ómegdartos". Tað er tað ikki. Tað er ein veruleiki, sum vit mugu gera okkum greiðan.

Í ES verða lond, sum hava færri enn 15 milliónir íbúgvar, roknað sum “smá lond”. Lond, sum hava færri enn eina millión íbúgvar, verða vanliga kallað “mikrolond”.

Malta, sum hevur 420.000 íbúgvar, er í løtuni minsta land í ES – og uppgávan at umsita limaskapin er ovurstór. Ísland verður mett at kunna umsita egnan limaskap, tí landið hevur royndirnar at umsita bæði EFTA-limaskapin og EBS-avtaluna – men avbjóðingin verður sera stór kortini.

Um Føroyar skuldi verið ES-limur á jøvnum føti við hini núverandi 27 londini, skuldu vit havt 6 limir í ES-Parlamentinum (sum er minsta talið). Í løtuni ger henda skipan, at Malta er yvir-umboðað í Parlamentinum við einum limi fyri hvørjar 70.000 íbúgvar. Í Fraklandi eru 874.000 fólk fyri hvønn lim. Í Danmark er ein parlamentslimur fyri hvørjar 385.000 borgarar. Skuldu Føroyar verið limur á jøvnum føti við hini londini, høvdu teir seks føroyingarnir í Brússel umboðað 8.000 fólk hvør. Tað er eyðsæð, at hetta ikki hevði borið til – tá høvdu fólk úr størru londunum ið hvussu er farið at tosað um “demokratiskt undirskot” hjá teimum og “demokratiskt yvirskot” hjá Føroyum.

Føroyskir ráðharrar skuldu harumframt tikið lut í tí orkukrevjandi virkseminum í ES-Ráðnum á jøvnum føti við ráðharrar, sum hava nógv størri embætisverk. Ja, Føroyar skuldu eisini havt formansskapin í ES-Ráðharraráðnum umleið 13. hvørt ár. Tað er ein ovurhonds krevjandi uppgáva hjá sjálvt stóru londunum. Vit høvdu ikki klárað tað. Vit eru snøgt sagt ov fá.

Skulu vit skapa okkum mest optimalu støðuna í altjóða samstarvi og tryggja Føroyum so nógv sjálvræði og so nógva ávirkan sum til ber, mugu vit byrja við at ásanna veruleikan.

Men okkara støða er ikki løtt. Tí samstundis sum vit helst hvørki kunnu fáa ella umsita fullan limaskap í ES ájavnt við hini londini, so eru tað statir, sum formliga sita við limakortunum og hava rættindini í ES.

Sum dømi kann eg nevna, at hóast yvir 7 milliónir fólk í ES tosa catalanskt, so er hetta




*Umsett verður til nógv mál í ES-Parlamentinum - men ikki til minnilutamál. Tí verður t.d. ikki umsett til catalanskt, hóast umleið sjey milliónir fólk í ES tosa hetta mál*

ikki eitt alment mál í ES-skipanini, tí einki limaland hevur catalanskt sum høvuðsmál. Men í mikrostatinum Andorra er catalanskt høvuðsmál, og tí hevði tað, um Andorra gjørdist limur (ið hvussu er sambært galdandi reglum) blivið eitt alment mál í ES, hóast har búgva færri enn 90.000 fólk. Altso: Tað eru statir, sum fyrst og fremst fáa rættindi - ikki statsleysar tjóðir.

Tað eru stovnar í ES, har sjálvstýrandi lond eru umboðað, og parlamentarikarar úr sjálvstýrandi londum hava tikið seg saman í bólkar, sum røkja felags áhugamál og royna at styrkja støðuna hjá tjóðum, sum ikki hava egnan stat. Ein av teimum størstu og mest virdu er European Free Alliance. At verið við har hevði sjálvandi gjørt Føroyar sjónligar og givið okkum ávirkan. Eg havi fleiri ferðir hildið fyrilestrar í slíkum felagsskapum, og tað sum ikki minst skapar áhuga fyri Føroyum er, at okkara sjálvstýri er so nógv meira umfatandi enn tað, sum hini londini hava. Sjálvt ikki stór lond sum Skotland og Catalonia hava líka nógv sjálvræði sum Føroyar.

Men av stovnunum í ES eru bert tríggir, sum hava veruligt lóggávuvald: Kommissiónin, Parlamentið og ES-Ráðið.

Kommissiónin kann kallast “stjórnin” í ES. Hon umboðar ES yvirskipað, og skal ikki taka tjóðskaparlig atlit.

Parlamentið skal umrøða, góðkenna og evt. broyta uppskotini frá Kommissiónini. Parlamentið umboðar fólkið í ES.

ES-Ráðið hevur á leið somu uppgávu sum Parlamentið, men umboðar limalondini í ES.

Eg skal nú hyggja at hesum trimum mest týðandi stovnunum í ES og fyrst meta um munin á at vera ein statur heldur enn at vera eitt sjálvstýrandi land sum Føroyar, og síðani meta um hvørjar møguleikar Føroyar hava, um vit gerast ES-limir gjøgnum Danmark.

## Kommissiónin

Tað er í ES-kommissiónini, at ES-lóggávan byrjar. Hetta er tann valdsmesti og størsti stovnurin við 25.000 fólkum í starvi.

Kommissiónin hevur “initiativrættin” – tað merkir, at bara hon hevur rætt at seta fram uppskot um nýggja ES-lóggávu. Síðani skal henda lóggáva góðkennast og tillagast av Parlamentinum og ES-Ráðnum.

Hvørt land hevur sín kommisser, og áðrenn eitt uppskot verður sent til Ráðið og



*25.000 fólk starvast í ES-Kommissiónini. Teir 27 kommisserarnir eru ikki valdir, men útnevndir av limalondunum. Hetta er ein av orsøkunum til, at tosað verður um "demokratiskt undirskot" í ES*

Parlamentið, skal meirilutin av teimum 27 kommisserunum siga gott fyri tí.

Kommiserarnir eiga ikki at umboða sítt egna limaland, men arbeiða fyri alt ES sum heild, og tí átti tað í prinsippinum ikki at gjørt nakran um, um eitt land sleppur at velja ein kommisser ella ikki.

Spurningurin er, um limalondini kortini kunnu ávirka teirra egna kommisser, tí kunnu tey tað, er eyðsæð, at tað er ein fyrimunur at vera eitt limaland heldur enn ein statsleys tjóð.

Og svarið er helst ja. Eingin er meira enn eitt menniskja, og tá stjórnin í einum landi hevur útnevnt ein persón, so kemst neyvan uttan um, at hetta ávirkar loyalitetin hjá viðkomandi. Tann sannroynd, at øll kenna best til viðurskiftini í egnum landi, hevur eisini týdning. Og at kommisserar ofta eru virknir politikarar, sum eisini ætla sær eina politiska yrkisleið í heimlandinum tá tíðin í Kommissiónini er av (sum danski kommisserurin Ritt Bjerregaard er dømi um), ger helst eisini, at heimlandið mangan er frammarlaga í huganum.

So hóast tað ikki kann prógvast, so man tað helst vera ein fyrimunur at hava ein kommisser úr egnum landi.

Í 2014 verður talið á kommisserum eftir ætlan lækkað, so bert 2/3 av londunum hava egnan kommisser í senn. Tað kann broyta støðuna. Fyri tað fyrsta fær hvør

kommisserur tá størri ábyrgd, størri fokus verður á hvønn einstakan – og limalond, sum ikki eru umboðað beinleiðis í Kommissiónini, fara helst at vera meira kritisk mótvegis kommisserum, sum eru undir illgruna um at taka tjóðskaparlig áhugamál fram um heildina.

## Parlamentið

Parlamentið er einasti stovnur í ES, sum hevur beinleiðis mandat frá borgarunum. Teir 754 limirnir eru býttir sundur í sjey bólkar ella “flokkar”.

Uppskotini frá Kommissiónini fara fyrst til Parlamentið, har tey antin verða vrakað, góðtikin ella broytt. Eins og í Løgtinginum verða uppskot beind í ymiskar nevndir. (Uppskotið, sum skal loyva ES at sanktionera Føroyar fyri makrelfiskiskapin, bleiv beint í fiskivinnunevndina í Parlamentinum. Nevndin royndi at herða uppskotið munandi. Men hesum tók hvørki samlaða parlamentið ella ES-Ráðið undir við - helst tí Kommissiónin segði, at um uppskotið varð hert, var tað brot á altjóða lóg). Verða uppskotini ikki vrakað, fara tey síðani víðari til ES-Ráðið, sum eisini skal góðkenna tey.

Harumframt velur Parlamentið kommissiónsformannin og skal góðkenna alla Kommissiónina.

Parlamentið hevur sostatt beinleiðis ávirkan – og tey smáu londini eru greitt yvirumboðað. Øll limalond fáa í minsta lagi seks limir, og jú fleiri fólk búgva í einum landi, jú færri limir fær landið fyri hvønn íbúgva.

Høvdu Føroyar verið sjálvstøðugur limur høvdu vit, í verandi støðu, havt krav um seks limir. Tað hevði sjálvandi verið sera gott. Men hetta hevði verið so ekstrem yvirumboðan av føroyska fólkinum, at tað hevði neyvan verið góðtikið í praksis.

Høvdu Føroyar blivið limir gjøgnum Danmark, skuldu vit tí samráðst við Danmark



*Í ES-parlamentinum eru 754 limir*



*ES-Kommissiónin gjørdi uppskotið, sum gevur ES heimild at seta tiltøk ímóti Føroyum fyri makrelfiskiskapin. Men Kommissiónin vil ikki brúka hesa heimild í ár, tí hon heldur ES hava skrivað sær sjálvum ov stóran part av kvotuni. Her er Sjúrður Skaale saman við Armando Astudillo, sum var ráðgevi hjá Kommissiónini í hesum máli. Myndin er tikin í fiskivinnunevndini í ES-Parlamentinum, tá málið varð viðgjørt har*

um at fingið ein av teirra limum. Okkara krav skuldi verið, at danska ríkið bleiv tvey valdømi – Danmark, sum valdi 12 umboð og Føroyar, sum valdu eitt umboð. Danmarkar tal av limum fer væntandi at lækka, og tí verður tað ikki bara-bara at fáa hetta kravið ígjøgnum. Men tað hevði verið rættiliga avgerandi fyri Føroyar, og eg rokni við, at tað hevði borið til. Tá Grønland var limur, hevði landið eitt av Danmarkar sætum í parlamentinum.

Tað er ymist, hvussu londini skipa valini til ES-Parlamentið. Í nøkrum londum eru valdømi sum gera, at alt landið verður umboðað, meðan onnur lond eru eitt valdømi.

Í Álandi (sí triðja part) er stór misnøgd við, at Finnland er eitt valdømi, soleiðis at álendingar í veruleikanum ongan møguleika hava fyri at fáa egnan lim í parlamentið. Sama ónøgd er t.d. í Catalonia, sum er undir-umboðað. Í Fraklandi eru átta valdømi, so øll øki fáa á leið somu umboðan.

Hóast ein limur tykist vera lítið, so høvdu vit kortini við einum limi verið betur umboðað í Parlamentinum í mun til fólkatalið enn nakað annað land. Og hóast samlaða talið er sera stórt, so kann tað hava stóran týdning at hava egnan lim í parlamentinum, sum kann upplýsa, fáa sambond, skipa fyri tiltøkum og tala á fundunum. Og ein parlamentslimur, sum leggur seg eftir ávísum málum, kann við røttum argumentum gera mun - í góðum samstarvi við tey embætisfólk, vit nú hava í Brússel.

Hevði Danmark – eins og Finnland ger móti Álandi – noktað Føroyum ein lim, høvdu vit staðið munandi veikari sum ES-limir enn við hesi umboðan.

## ES-Ráðið

Tað er í ES-Ráðnum, at áhugamálini hjá limalondunum skulu røkjast, og tí er tað eisini her, at fyrimunirnir við egnum limaskapi mugu metast at vera størst.

Limir í ES-Ráðnum eru stjórnirnar í limalondunum, sum verða umboðaðar av ymiskum ráðharrum – alt eftir, hvørji mál eru til viðgerðar. Eru tað umhvørvismál, møta teir 27 umhvørvisráðharrarnir osfr.

Limalondini skiftast um at hava leiðsluna av ES-Ráðnum í seks mánaðir í senn. Hetta verður ofta nevnt at hava "formansskapin í ES".

Einki uppskot frá Kommissiónini kann fáa gildi uttan so, at ES-Ráðið hevur góðkent tað.

Tilsamans 345 atkvøður eru í ES-ráðnum. Tey størstu londini hava 27 atkvøður í part, og síðani lækkar talið. Malta hevur tríggjar atkvøður. Danmark hevur sjey.

Skal eitt uppskot góðkennast, skal meira enn helvtin atkvøða fyri, og minst 255 atkvøður skulu vera latnar. Í ávísum týðandi málum – t.d. um trygdarmál ella ES-skatt – skulu øll vera samd.

Eisini í ES-Ráðnum hava tey smáu londini lutfalsliga meiri vald enn tey smáu, men hetta verður sambært Lissabon-sáttmálanum eitt sindur javnari í 2014 tí tá skulu tey, sum atkvøða fyri, umboða minst 65% av fólkinum í ES um eitt mál skal verða samtykt. Tað verður altso ikki nóg mikið at hava meirilutan av atkvøðunum - hesar atkvøður skulu eisini umboða meirilutan av fólkinum.

Tað er púra eyðsæð, at fyrimunurin við egnari umboðan í ES-Ráðnum er sera stórur sæð í mun til at vera eitt land uttan egna umboðan.

Um Føroyar gerast ES-limir gjøgnum Danmark, mugu vit tingast við danska ráðharran

og fáa hann at føra fram okkara sjónarmið. Tað minnir um støðuna vit hava í nøkrum altjóða felagsskapum í dag - eitt nú Altjóða Hvalaveiðunevndini.

At noyðast gjøgnum Danmark er ikki meira enn næstbest – men heilt ómøguligt er tað ikki at ávirka tann vegin. Tá heimildarlógin, sum gav ES heimild at boykotta Føroyar fyri makrelfiskiskapin var fyri í ES-Ráðnum, talaði nógv fyri, at Danmark skuldi atkvøða ja:

- Danmark hevði formansskapin, og tað verður sera illa dámt um eitt formansland røkir egin áhugamál.
- Danmark tók ikki undir við føroysku sjónarmiðunum.
- Danski makrelídnaðurin legði stórt trýst á til tess at fáa Danmark at atkvøða við meirilutanum.

Hóast hetta eydnaðist tað at fáa Danmark at umboða føroysk sjónarmið rímiliga væl. Danmark atkvøddi blankt – tað er næstan tað sama sum at atkvøða nei, tí tað eru bara ja-atkvøðurnar, sum eru avgerandi. Ein nei-atkvøða annullerar ikki eina ja-atkvøðu. Danmark kravdi eisini, at lógin skuldi lúka allir treytir í øllum altjóða sáttmálum – og lat hurðina upp fyri, at Danmark kundi umboða Føroyar í einum møguligum sakarmáli móti ES. Alt eftir ynski úr Føroyum.

Eg hevði fleiri fundir við stjórnina um hetta mál og gjørdi greitt, at eg ikki kundi stuðla stjórnini, um hon ikki tók eina støðu, sum var nøktandi fyri Føroyar. At eg siti við einari av teimum trimum norðuratlantisku atkvøðunum, sum tryggja stjórnini meirilutan, hevur helst havt týdning – men hetta málið vísir kortini, at tað ber til at hava ein góðan dialog við donsku stjórnina. Og tað er eyðsæð, at vóru Føroyar limir í ES, hevði danska stjórnin í nógv størri mun verið politiskt pliktað til eisini at tala og atkvøða vegna Føroyar í øllum viðkomandi málum.

Tað er ein royndur lutur, at tjóðir, sum ikki hava egnan stat, spæla ein minni leiklut í ES enn tær, sum hava egnan stat. Men smáir statir spæla eisini minni leiklutir enn stórir statir. Tað, sum er avgerandi, er hvussu ein plaserar seg í skipanini, hvat ein leggur dent á, og hvønn ein samstarvar við.

Og sum limur í ES-familjuni hava Føroyar møguleikar, sum vit ikki hava uttanfyri. Serliga um Ísland verður limur.

Eg kann taka eitt annað dømi. Bæði í 2011 og 2012 hava føroyskir saltfiskaframleiðarar verið raktir av einum forboð móti at nýta fosfat í saltfiski sum fer á ES-marknaðin. Hetta evnið hevur verið nýtt í mong ár. Tað er púra óskaðiligt, men gevur fiskinum

betri konsistens, betri lit, betri smakk – og betri prís. Tað verður eisini nýtt í aðrari matframleiðslu.

Bæði Ísland, Noreg og Føroyar blivu rakt, tá tað bleiv bannað – og slagið var hart, tí ES er nógv tann størsti keyparin av saltfiski.

Kommissiónin hevur fleiri ferðir – við dyggum vísindaligum grundgevingum – skotið upp at taka bannið av, men tað hevur hvørja ferð eydnast Portugal at forða tí við at fáa lond, sum ongan áhuga hava í málinum, at stuðla sær.

Ísland, Føroyar og Noreg hava roynt at ávirka málið rættan veg uppá allar hugsandi mátar. Eg havi t.d. sjálvur, í samstarvi við Vinnuhúsið og danskar fiskaútflytarar, roynt at fingið donsku stjórnina at framt lobby virksemi mótvegis øðrum londum. Tað sama hevur føroyska sendistovan í Brússel.

Men bannið er framvegis galdandi. Bæði Noreg, Ísland og Føroyar mugu geva okkum undir reglur, sum vit onga ávirkan hava á. Danska stjórnin stuðlaði – men høvdu londini, hetta fyrst og fremst snúði seg um, havt eina rødd inni í skipanini, høvdu vit staðið nógv sterkari.

# Loysing krevur samband

Frá loysingarrørsluni í Føroyum verður ofta sagt, at fara vit upp í ES sum partur av Danmark, hvørva Føroyar sum land. Vit missa okkara samleika og okkara sjálvræði. Og vit missa møguleikan at taka fult sjálvstýri seinni. At loysa frá Danmark er trupult. Men skulu vit loysa frá bæði Danmark og ES, verður uppgávan ómøgulig. Vit stoypa okkum føst í eina støðu sum danskur landslutur í allar ævir.

Tað er ikki løgið, at nógv hugsa soleiðis, tí Føroyar standa á mangan hátt í Danmarkar skugga. Tá føroyingar hava viljað styrkt sín tjóðskaparliga samleika - ikki minst málsliga - hevur tað ofta verið við at ganga ímóti tí, sum er danskt. At velja tað sama sum Danmark er fyri nógvar føroyingar tað sama sum at velja tað føroyska frá, tí tað, sum er føroyskt, er tað, sum ikki er danskt.

Hetta er náttúrligt, tá hugsað verður um okkara søgu og okkara ríkisrættarligu støðu. Men kanska tað viðhvørt skuggar fyri útsýninum og setir okkum ov nógv í verjustøðu. Eg eri til dømis bangin fyri, at “loysing” í hugaheiminum hjá summum føroyingum meira merkir at velja Danmark frá enn at velja nakað annað.

Men vit kunnu ikki bara velja frá. Vit mugu eisini velja okkurt.

Og vit kunnu ikki velja “fult sjálvræði”. Eitt so lítið land sum Føroyar *má* vera ein samrunnin partur av eini størri skipan. Tað mugu lond, sum eru nógv størri enn Føroyar eisini.

Siga vit nei til bæði ríkisfelagsskapin og nei til ES, stíga vit út í tóman heim. Tað ber snøgt sagt ikki til.

Spurningurin, vit eiga at seta okkum, er ikki hvat vit skulu siga nei til, men hvørjum vit skulu vera partur av. Hvørjir møguleikarnir eru og hvør prísurin er.

Og at prísurin fyri ES-limaskap er, at vit missa okkara samleika, er ikki rætt. Tann, sum ferðast gjøgnum ES sær skjótt, at bæði lond og tjóðir sanniliga hava varðveitt síni eyðkenni og sín samleika. ES roynir ikki at útjavna mentanarligu munirnar – hinvegin eru fleiri skipanir, sum eru ætlaðar at menna og styrkja samleikan hjá smáum, statsleysum tjóðum.

Politiskt eru sjálvstýrisrørslurnar í Skotlandi, Catalonia, Baskalandi ella Flandern heldur ikki viknaðar av, at statirnir, hesar tjóðir hoyra til, eru við í ES. Tvørturímóti – tær standa sterkari enn nakrantíð áður. Ja, tær sita enntá nógvastaðni við politiska meirilutanum.

Og meðan tað fyri einum tveimum áratíggjum síðani var vanligt, at loysingarrørslur

eisini vóru anti-ES rørslur, so er tað als ikki soleiðis longur. Allir teir stóru loysingarflokkarnir í Evropa hava í dag sum mál, at teirra lond skulu halda fram sum ES-limir eftir loysingina. Teir ásanna, at eingin kann loysa út í tóman heim. Eitt land, sum ikki er partur av eini størri skipan, kann ikki fóta sær.

Hetta hevur gjørt, at meðan ES leingi er víðkað við at nýggj limalond eru komin inn, so eru tey nú farin at tosa um "innvortis víðkan" av ES. Tað merkir, at ES fær nýggj limalond, sum koma "innanífrá". Um t.d. Skotland loysir frá Bretlandi ella Catalonia loysir frá Spania, so verður talan um slíka víðkan – tí hvørki av londunum ætlar at fara úr ES. Tá Grønland fór úr EF, bleiv tað verandi ein partur av Danmark. Ætlanin hjá teimum sum nú ætla at loysa, er tann øvuta: At loysa frá "móðurlandinum", men verða verandi í ES.

Tað er ilt at siga, hvussu gongdin í teimum nevndu londunum verður, og hvussu ES fer at skipa slíka "innvortis víðkan" í verki. Men koma slík fordømi, er eyðsæð, at tað verður nógv lættari hjá Føroyum at loysa frá Danmark og taka fullveldi, tá vit eru partur av ES, enn nú, tá vit eru uttanfyri.

Loysa vit frá Danmark sum ES-limur, eru vit longu partur av eini størri skipan. Tá verður talan um at skifta nakrar myndugleikar út við aðrar, og broyta nakrar "kommandolinjur". Loysa vit uttan at vera partur av ES, verður loysingin at stíga út í sera stóra óvissu. So stóra, at tað verður ógjørligt at fáa undirtøku fyri tí.

Eg haldi sum sagt ikki, at vit megna til fulnar at umsita sjálvstøðugan føroyskan limaskap í ES. Tað er neyvan heldur realistiskt, at vit kunnu fáa limaskap á jøvnum føti við stóru londini.

Men eitt er vist: Vit klára betur at umsita ein slíkan limaskap, enn vit klára at skipa og umsita ein stat, sum stendur einsamallur og ikki er partur av ES.

Tí er tað ein andsøgn, at teir føroyingar, sum vilja hava loysing frá Danmark, í mongum førum eisini eru hart ímóti ES-limaskapi. Tí sannleikin er helst tann, at slíkur limaskapur er einasti møguleiki fyri loysing frá Danmark.

# Formligt fullveldi – men lítið sjálvræði

Nú á døgum eru fáir danskir politikarar, sum sýna Føroyum serliga stóran áhuga. Mínar royndir úr Fólkatinginum eru, at flestu teirra antin vita ov lítið um Føroyar til at kunna gera sær nakra meining – ella eru teir bangnir fyri at siga sína meining, tí teir ikki vilja verða ákærdir fyri at "blanda seg uppí".

Men nakrir eru. Ein teirra er Steen Gade úr SF, sum var ein av høvuðspersónunum aftanfyri Danmarkar "nei" til Maastricht-sáttmálan í 1992 og ta tjóðskaparligu semjuna - "*det nationale kompromis*" - ið seinni gjørdist grundarlag undir Danmarkar støðu í ES.

Hann hevur, sum mong á danska vinstravonginum, stóran samhuga við sjálvstýrisrørslunum í Føroyum og Grønlandi, og sigur í bók síni "Gades Europa", at "*eg havi alla tíðina kent meg sameindan við bæði tí grønlendska og føroyska fólkinum í teirra stríði fyri at koma út úr tí danska skugganum. At koma burtur frá tí gamla kolonivaldinum við tess kúging og tess skeivu avgerðum.*"

Men Steen Gade heldur tað vera eitt grundleggjandi mistak at stíla ímóti fullum, formligum sjálvræði. Tí tað er ikki tað at hava egnan uttanríkisráðharra og talutíð í ST, sum ger eitt land sjálvstøðugt. Formligt fullveldi hjá heilt smáum londum er nakað heilt annað enn veruligt sjálvræði.

Og so kemur hann við hesum áhugaverda uppskoti:



*"Heilt smá lond [sum Grønland og Føroyar] kunnu fáa formligt fullveldi, men teirra rásarúm verður nógv minni enn tann loysn, sum eg fari at skjóta upp. Tí eg skilji væl, at Grønland og Føroyar vilja gerast minni bundin av Danmark. Tað sum eg ikki skilji er, hví hesi ikki av álvara hugsa um at gerast limir í ES. (...) Mítt uppskot er, at bæði Grønland og Føroyar lima seg inn í ES og knýta tøtt sambond við ES-Kommissiónina. Soleiðis kunnu tey hvørt sær gera seg nógv leysari av Danmark, um tað er tað, tey ynskja. Tey fara at kunna javnviga teirra sjálvræði nógv betur. Fyri Føroya viðkomandi millum Danmark, ES og Statoil ella hvat fyri felag tað nú verður, sum finnur oljuna. Fyri Grønlands viðkomandi millum Danmark, ES, USA og Kanada. Eg eri bangin fyri, at einoygt fokus á formligt fullveldi kann gerast ein sera vandamikil blindvegur fyri bæði londini".*

Hetta er vert at hugsa um. Um føroysku loysingarflokkarnir útiloka alt annað enn formligt fullveldi kann úrslitið so verða, at Føroyar verða meira og meira isoleraðar

frá heiminum – innibyrgdar í einum donskum heimastýri? Kann tað hugsast, at politikkurin hjá ytsta loysingarvonginum og ytsta sambandsvonginum førir til sama úrslit – nevniliga at vit als ikki flyta okkum?

Eg eri bangin fyri tí. Tá uppskotið um stjórnarskipan Føroya var fyri í 2011, var tað ið hvussu er júst hetta, sum hendi: Loysingarvongurin vildi heldur vraka alt uppskotið enn góðkenna eina orðing, har vit viðurkendu tær stjórnarrættarligu lógir og skipanir, sum eru galdandi í dag. Tí datt alt á gólvið, og føroyingar stóðu eftir við danskari grundlóg og heimastýrislóg. Uppskriftin hjá loysingarvonginum var fullveldi - men rætturin, sum fólkið fekk, var óbroytt heimastýri.

# EFTA og EBS – ein leið sum ongan veg førir

Í eini roynd at vinna Føroyum lut í teimum fýra frælsunum, sum eru galdandi í tí innara marknaðinum í ES, men kortini standa uttanfyri ES, hava føroysk landsstýri roynt at ganga eina knortluta gøtu:

Fyrst at fáa limaskap í EFTA (evropeiska fríhandilsfelagsskapinum), og síðani tann vegin gerast partur av EBS (Evropeiskum Búskaparligum Samstarvi) - sum knýtir ES og EFTA londini saman í ein marknað.

Uppgávan hevur verið undirmett. Fyri tað fyrsta vilja verandi EFTA og EBS-lond (kanska undantikið Ísland) ikki hava okkum við.

Fyri tað næsta hevði tað verið ein ovurhonds uppgáva hjá føroyingum at umsitið hetta einsamallir. (Og tað er kanska ein av orsøkunum til, hini londini eru so skeptisk).

Um EFTA er at siga, at 10 lond hava verið limir, men nú eru bara fýra eftir. Hesi fýra londini - Ísland, Noreg, Sveis og Liechtenstein - mugu, fyri at vera partur av EBS-avtaluni, seta yvir 70% av ES-lóggávuni í verk, uttan at hava nakra sum helst ávirkan á hesa lóggávu. Her er altso talan um "demokratiskt undirskot" so tað stendur eftir í.

Eg skal ikki siga so nógv meira um hetta annað enn at staðfesta, at hetta er roynt - og tað bar ikki til. Og høvdu hini londini givið okkum limaskap, er stórur vandi fyri, at okkara umsiting hevði hoknað undir uppgávuni fyrst at røkja EFTA limaskapin, og síðani sjálv seta 70% av ES-lóggávuni í verk.

Eg haldi, at vit endaliga eiga at staðfesta, at hetta ikki er nøkur leið at fara.

# Tað ber til at fáa undantøk

Tá David Cameron í januar í ár boðaði frá, at Bretland kravdi ymiskar serskipanir um ES-limaskapurin skuldi halda fram, kom - ikki óvæntað - harður kritikkur úr øllum ES.

Kendi svenski uttanríkisráðharrin, Carl Bildt, tók væl samanum, tá hann í eini viðmerking til Cameron segði: "Um vit lata upp fyri einum ES, har hvør kann velja tað hann vil, hava vit til endans einki Evropa longur. Bara eitt øgiligt órudd".

Hetta er rætt – um tey stóru, avgerandi londini ikki geva seg undir somu treytir, ber hvørki til at styrkja ella yvirhøvur varðveita samveldið.

Men her hava tey smáu londini, sum ikki hava egnan stat, í veruleikanum ein fyrimun. Tað finst ein rúgva av serskipanum fyri "serlig viðurskifti" hjá útjaðaraøkjum. Man og Ermasundsoyggjarnar kunnu til dømis útflyta tollfrítt til ES. Tí mugu tær tillaga lóggávuna á tí økinum - men sleppa undan flestu øðrum ásetingum um tær vilja.

Í hesum ritinum hava vit hugt nærri at Álandi. ES vildi hava Áland sum lim saman við Finnlandi. Tí kundu tey at seta stór krøv – eisini krøv, ið gingu beint ímóti sjálvum grundprinsippunum, sum ES byggir ár. Og tað eydnaðist. Áland fekk undantøk, sum tað, á pappírinum, als ikki átti at borið til at fingið.

Hetta vísir at hóast ES er rættiliga stirvið tá tað snýr seg um undantøk til stór lond, so er tað meira liðiligt, tá tað snýr seg um smáar tjóðir ella smá øki, sum hava serligan tørv.

Føroyum tørvar fyrst og fremst at fáa undantak frá felags fiskivinnupolitikkinum. Men fuglaveiða, seyðahald og grindadráp eru eisini viðurskifti, har vit mugu stríðast fyri at fáa undantøk, skuldu vit farið undir samráðingar.

Læran úr Álandi er, at tað ber til at fáa nógv og víðfevnd undantøk, og soleiðis at varðveita egnan samleika - ikki bara mentanarliga, men eisini politiskt og juridiskt.

## Arktis gevur Føroyum sterka samráðingarstøðu

Hví skuldu Føroyar fingið undantøk í samráðingum um limaskap? Hvør orsøk er hjá ES at royna at fáa Føroyar við, um okkara havøkið verður verandi undir føroyskum málsræði?

Ein orsøk er Arktis. ES vil hava lut í og ávirkan á tað, sum hendir í Arktis, og leggur stóran dent á at fáa umboðan har, sum avgerðirnar verða tiknar. Trupulleikin er, at í løtuni er einki viðkomandi landaøkið innanfyri ES-mark.

Føroyar eru mitt í teimum nýggju siglingarleiðunum. Í løtuni gera vit okkara egnu ætlan fyri, hvussu hetta kann skapa virksemi í landinum - okkara egnu "arktisku strategi". Tað skulu vit eisini hava. Men høvdu vit verið limir í ES høvdu møguleikarnir helst verið størri. Vit kundu fingið ein avgerandi leiklut í politikkinum hjá ES á hesum øki - ja, hann kundi í ávísan mun tikið støði í Føroyum.

Danmark roynir sum er okkara vegna at venda eygunum hjá ES móti Føroyum - men vóru vit partur av samveldinum, komu vit heilt náttúrliga í fokus.

At Føroyar eru har tær eru ger tær attraktivar fyri ES, og tí er hugsandi, at vit bæði kundu tryggja okkum ein nógv størri lut í menningini í Arktis enn annars, og kundu fingið tey undantøk innan serliga fiskivinnuna, sum vit hava so stóra tørv á.

# Føroysk stjórnarskipan vantar

Tað eru kortini nakrir munir millum Áland og Føroyar, sum tað er vert at hava í huga. Meðan Føroyar hava nógv størri veruligt sjálvræði enn Áland, so er serstøða Álands betur juridiskt kjølfest enn okkara, tí hon er beinleiðis skipað í fólkarættinum og kann ikki broytast uttan við eini fleirtjóða avtalu. Okkara støða byggir fyrst og fremst á siðvenju og eina drúgva politiska menning. Reint juridiskt hava vit ikki annað enn donsku grundlógina, heimastýrislógina og uttanríkispolitisku heimildarlógina at standa á. Grønland stendur eisini formliga sterkari enn Føroyar við síni sjálvstýrislóg.

Í Føroyum eru vit ósamd um, hvør okkara formliga rættarstøða er, og hvør okkara støða er til danska statin – men tann optikkur, sum danska stjórnin hyggur at Føroyum ígjøgnum, er danska grundlógin.

So hóast okkara sjálvstýri er ómetaliga stórt – helst størri enn hjá nakrari aðrari statsleysari tjóð – so er tann formliga, løgfrøðiliga grundin ikki so dygg.

Gerast vit partur av ES gjøgnum limaskapin hjá danska statinum, so er hetta ein veikleiki.

Tað er ein av mongum orsøkum til, at vit áttu at funnið saman um eina føroyska grundlóg, sum, tá tað snýr seg um okkara yvirskipaðu rættarstøðu, bygdi a grundreglurnar í tí uppskoti, sum tað næstan eydnaðist at fáa samtykt í 2011:

- Valdið í Føroyum er hjá Føroya fólki.
- Danmark umsitur nøkur málsøki okkara vegna, men vit hava rætt at taka við málsræðinum.
- Vit virða tær stjórnarrættarligu skipanir, sum eru galdandi, men kunnu seta tær úr gildi.
- Vit kunnu, eftir nærri ásettari mannagongd, lata millumtjóða felagsskapum heimildir, sum nú eru hjá føroyskum myndugleikum.

Hetta seinasta hava vit ikki heimild til sum er, og í "Gula Álitinum" verður víst á, at tað er ein forðing: "*Sum er hava Føroyar onga innlendska løgfrøðiliga mannagongd til at flyta ræðisrætt úr Føroyum til annað land ella altjóða felagsskap. Sum limur í ES høvdu Føroyar verið noyddar at latið part av sínum ræði til ES. Neyðugt hevði verið at broytt galdandi stýrisskipanarlóg*".

At seta í verk egna stjórnarskipan kann sjálvsagt geva somu heimildir sum at broyta stýrisskipanarlógina. Men fæst hetta ikki í lag, verður tað Danmark, sum má flyta heimildir úr Føroyum til Brússel. Tað hevði verið sambært avtalu við føroyskar

myndugleikar, men við teirri mannagongdini høvdu vit ikki kunnað knæsett grundregluna um, at evsta valdið og heimildin er í Føroyum.

Okkara støða – og okkara politiski samleiki – hevði verið sterkari, um vit fyrst fingu eina stjórnarskipan sum ásetti, at hóast vit eru partur av ríkisfelagsskapinum, so eru valdið og heimildirnar hjá okkum.

Hetta er galdandi uttan mun til, hvønn veg vit velja at fara í framtíðini. Men eftir mínum tykki er egin stjórnarskipan - ella ein sjálvstýrislóg átøk teirri grønlendsku - næstan ein fortreyt, skulu vit gerast limir í ES.

# Vit mugu vita – ikki gita

Tað var rætt at standa uttanfyri EF, tá Danmark gjørdist limur í 1973. Men ES í dag er ikki tað sama, sum EF var tá. ES í dag er heldur ikki tað sama, sum ES verður í morgin.

Í dag er næstan alt Evropa sameint gjøgnum ES.

Tað eru tó stórir trupulleikar í fleiri av londunum, og har fær ES skyldina og missir tí undirtøku. Í nøkrum av londunum sum eru væl fyri, vilja fólk ikki hjálpa teimum, sum eru verri fyri, og tí minkar undirtøkan eisini har.

Men hóast tað ikki kann útilokast, er tað lítið hugsandi, at ES dettur sundur. Tey flestu duga at síggja, at eitt Evropa, sum ikki stendur saman, er nógv veikari. Og hóast tað kann tykjast órættvíst er tað í longdini rætt av teimum ríkaru londunum at hjálpa teimum fátæku á føtur. Tað skilti USA tá Marshall hjálpin varð sett í verk eftir seinna heimsbardaga, og tað skilir stjórnin í Týsklandi í dag.

Føroyar eru helst tað evropeiska landið, sum hevur tað veikasta tilknýtið til ES yvirhøvur. Ein handilsavtala - tað er alt. Hon er nøktandi fyri tað, vit útflyta sum er - men hon skerjir okkara menningarmøguleikar, tí vit sleppa einki annað at útflyta uttan at samráðast um nýggja avtalu. Og skipanin ger, at vinnan er ótrygg, tí eingin veit nær broytingar koma.

At Ísland og Noreg ikki eru fullgildigir ES-limir hevur helst gjørt, at okkara handilsavtala er so fræg, sum hon er. Men nú hevur Ísland kós móti fullum limaskapi. Og hóast Ísland ikki verður limur í bræði er sannlíkt, at tað hendir um nøkur ár. Íslendskur limaskapur broytir okkara umstøður nógv, og kann gera, at lívið uttanfyri ES verður nógv truplari, enn tað er nú.

Innan tann avgerandi fiskivinnupolitikkin henda eisini broytingar. ES endurskoðar sína skipan, og møguleikar eru fyri, at Ísland fær eitt umfatandi undantak. Eitt undantak, sum vit eisini kundu fingið gagn av.

Sum heild bendir nógv á, at prísurin fyri at standa uttanfyri ES kann gerast størri og størri.

Sum parturin um tá Føroyar søgdu nei til EF sýnir, vóru tá fleiri politikarar, sum østu fólk við ógvusligum og følskum ræðumyndum av samstarvinum í Evropa. Tað var til dømis langt frá veruleikanum í 1970, at EF var ein hernaðarsamgonga. Tað passaði ikki, at tað ikki bar til at fara úr EF aftur, um ein fyrst var farin inn (Grønland fór jú úr seinni). Og tað var heldur ikki rætt, at Føroyar ikki kundu standa uttanfyri, um Danmark fór inn.

Ógvusliga mótstøðan móti evropeiska samstarvinum er framvegis sterk í Føroyum, og enn hava fordómar um ES fastatøkur á føroyingum. Hetta ger tað trupult at tosa opið um møguleikar og vansar við føroyskum limaskapi. Og tað er sera óheppið, at vit blíva við at bera okkum undan hesi avbjóðing.

Í Íslandi hevur verið og er eisini sterkur mótvilji. Men sum parturin um Ísland sýnir, eru nógvar góðar grundir til at fara uppí - ikki minst at lata upp fyri útlendskum íleggjarum, sum við limaskapinum fáa vissu fyri stabiliteti og tryggleika, tá tað snýr seg um lóggávu og valuta.

Hetta er eisini viðkomandi fyri okkum. Tað ræðir útlendskar íleggjarar, at vinnulóggávan svingar aftur og fram sum eitt pendul.

Og hvat nú um Ísland verður limur? Tað broytir fortreytirnar fyri okkara avtalu við ES, og kann gera støðuna sera trupla. Hinvegin kann Ísland slóða fyri eini fiskivinnavtalu, sum eisini hevði verið nøktandi fyri okkum. Umstøðurnar kunnu broytast heilt grundleggjandi, og tí mugu gamlar hugsanir ikki forða fyri, at vit fara nýggjar leiðir.

Í Álandi tykist ES-limaskapurin hava havt ta ávirkan, at landið er latið meira upp mótvegis øðrum londum. Fyrr høvdu flest allar skipanir samband við Finnland – nú er latið upp aðrar vegir eisini, og álendingar fara t.d. í nógv størri mun enn áður til serliga Svøríkis at taka útbúgvingar. Vert er eisini at geva gætur, at fólkatalið í Álandi er vaksið síðani landið gjørdist ES-limur. Tað er ikki óhugsandi, at tað sama hevði hent hjá okkum.

Tað er ið hvussu er greitt, at føroyskur limaskapur, hóast hann ikki var beinleiðis sum ein statur, hevði latið nakrar dyr upp – bæði frá Føroyum móti ES, og frá ES móti Føroyum. Vit høvdu blivið ein formligur partur av evropeisku familjuni, og partur av teimum mongu skipanum av øllum hugsandi slag, sum Evropa byggir á í dag.

Sjálvandi hevur tað ein prís. Men at dyrnar millum Føroyar og ES ikki standa opnar, hevur eisini ein prís. Hann kenna vit. Men sum álendsku royndirnar vísa, kenna vit ikki prísin fyri limaskapin, fyrr enn vit hava verið í samráðingum um limaskap. Fleiri litt embætismannaálit geva ikki svarið.

ES er ein veruleiki, sum vit mugu taka støðu til við opnum sinni. At siga nei til limaskap uttan at vita hvat tað er, vit siga nei til, kann gerast sera dýrt í longdini.

Vit eiga – sum onkur segði – at vita og ikki gita.

Vónandi kann henda útgáva vera við til at menna vitanina og kveikja áhuga fyri, hvørja støðu Føroyar skulu hava í Evropa.

# 2. PARTUR

# Føroyskt nei til Evropeiska Felagsskapin

**Við fólkaatkvøðu í 1972 trein Danmark inn í Evropeiska Felagsskapin (EF) frá 1. januar 1973 at rokna. Samstundis helt limaskapur Danmarkar í EFTA uppat. Sum partur av danska ríkinum fóru eisini Føroyar, sum gjørdust EFTA limur í 1968, burturúr felagsskapinum. Føroyskur EF limaskapur kom ongantíð til eina fólkaatkvøðu, og í januar 1974 var politiska avgerðin um at ikki gerast partur av EF endaliga tikin**

Síðst í 60'unum var politiskt fokus á, hvørt Føroyar skuldu gerast limur í Evropeiska Felagsskapinum (EF - ella EEC sum tað kallaðist tá), tí møguleiki var fyri at Danmark gjørdist limur. Hetta førdi við sær stórt kjak um, hvussu støða Føroya skuldi vera, um Danmark fór uppí felagsskapin. Skuldu Føroyar fara uppí saman við Danmark, ella skuldu Føroyar standa einsamallar uttanfyri?

Í 1964 varð føroyska fiskimarkið víðkað úr trimum til tólv fjórðingar. Víðkanin hevði við sær stóran vøkstur í føroyska búskapinum. Týdningurin av fiskiskapinum fyri føroyska búskapin sást serliga í tí, at rávørusølan til framleiðslu á flakavirki einamest kom frá føroyska heimafiskiskapinum. Eftir víðkanina av fiskimarkinum meiri enn trífaldaðist framleiðslan av frystum fiskaflaki. Hetta, og útlitini fyri at víðka fiskimarkið heilt út á 200 fjórðingar, fylti tískil nógv í samfelagskjakinum.

Í 1970 fóru Danmark, Bretland, Írland og Noreg undir samráðingar við EF um møguligan limaskap. Undir samráðingunum segði danski marknaðarráðharrin, at fyri Føroyar og Grønland kundu taka seg upp serligir spurningar, sum gjørdu tað neyðugt, at serskipanir av ymsum slagi vórðu gjørdar fyri hesar partar av ríkinum. Hetta setti av álvara ferð á kjakið í Føroyum um, hvørt Føroyar skuldu fylgja Danmark inn í felagsskapin.

*Ein av mongum ræðumyndum sum vórðu at síggja, tá EF-kjakið leikaði á.*




*Mynd: Fylkingin januar 1973*

# Kjakið

Um hetta mundið var fiskiídnaðurin við flakavirkjum lutfalsliga nýggjur í Føroyum. Hesin ídnaður gav fleiri arbeiðspláss á landi og varð ein alsamt størri partur av útflutninginum og tjóðarúrtøkuni. Síðani víðkanina av fiskimarkinum út á 12 fjórðingar, hevði føroyska veiðan innanfyri markið verið støðugt vaksandi. Hetta hendi í eini tíð, har fiskiskapurin í øðrum pørtum av Norðuratlantshavinum minkaði, og sostatt fekk heimafiskiskapurin í Føroyum alsamt størri týdning.

Í valskeiðinum 1967–1970 myndaðu Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin samgonguna, við ávikavist Peturi Mohr Dam og Kristiani Djurhuus sum løgmonnum. Úrslitið av valinum í 1970 gjørdist, at Tjóðveldisflokkurin vann ein sess og fekk 6 tinglimir, meðan Fólkaflokkurin misti ein sess og fekk 5 tinglimir. Hinir flokkarnir høvdu allir óbroytt tingmannatal: Javnaðarflokkurin sjey, Sambandsflokkurin seks, Sjálvstýrisflokkurin ein og Framburðsflokkurin ein. Í alt 26 tinglimir mannaðu Løgtingið hetta valskeið. 12. desember varð greitt, at fyrrverandi samgongan við Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum aftur fór at manna landsstýrið – men nú við Atla P. Dam og Javnaðarflokkinum á odda.

Kjakið í bløðunum hesa tíðina var serliga merkt av óvissuni um hvørjar avleiðingar ein møguligur føroyskur EF limaskapur fór at hava við sær. Nógvar ræðumyndir og spekulatiónir vórðu førdar fram, og størsti óttin av øllum var felags fiskivinnupolitikkurin hjá EF. Kjakið gekk hart fyri seg í bløðunum, sum tá umboðaðu støðuna hjá teimum ymisku flokkunum.

19. november 1969 skrivaði blaðið hjá Tjóðveldisflokkinum, 14. september, at EFTA hevði minkað um møguleikarnar fyri at skapa eitt fjølbroytt vinnulív og at limaskapur í EF fór at hava somu avleiðingar.

Upp undir løgtingsvalið 7. november 1970 kom veruliga ferð á EF kjakið, sum gjørdist eitt av høvuðsmálunum í valstríðnum. Fjúrtandi skrivaði hin 4. november 1970 soleiðis: *"...endamálið er í Europa at skapa eitt vinnulív, ið er kappingarført við tað hjá USA og Russlandi. Til tess verður tað hildið neyðugt at tey virki, ið eru stór, gerast størri og at tey, ið eru smá, hvørva heilt. Arbeiðararnir skulu so flyta frá útjaðaranum til stórbýirnar, har framleiðslan loysir seg best fyri virkini. Hetta er tað, ið hendir í dag, har ½ miljón av italiumonnum úr Súðuritalia arbeiða í Rhurøkinum í Týsklandi."*

Óttin fyri at stóri kapitalistiski felagsmarknaðurin skuldi taka lívið av lítla føroyska fiskimanninum var stórur og ræðumyndir um avtoftaðar Føroyar, og fiskimenn sum máttu rýma av landinum at finna sær arbeiði, bórust dagliga millum manna.




*Um sama mundið sum Danmark segði ja, segði Noreg nei til EF-limaskap. Tulkingin hjá Fólkafylkingini móti EEC var greið: Danmark er tað svarta lambið, sum rýmir úr teirri norðurlendsku familjuni. Nú er familjan savnað í ES. Bara Føroyar eru heilt uttanfyri. (Fylkingin, desember 1972)*

Tjóðveldisflokkurin var hart ímóti føroyskum limaskapi og hartaði landsstýrið fyri at vilja dylja yvir, at Føroyar undir núverandi stjórnarskipan ikki kundu standa uttanfyri, um Danmark valdi at gerast limur. Føroyar vóru sostatt noyddar at fylgja við inn í felagsskapin. Erlendur Patursson skrivaði í 14. September hin 4. november 1970, at: “*Málið um inngongu okkara í felagsmarknaðin (EF) hevur bert verið einaferð til umrøðu og viðgerðar á tingi. Og ikki meira enn eina viku (3.-9. nov. 1961) helt tingið vera neyðuga til avgreiðslu av hesum máli, ið kemur at ávirka føroyingsins lív og lagnu – ikki bara búskaparliga, men eisini tjóðskaparliga, mentunnarliga, sosialt, andliga osfr. á øllum umhvørvum samfelagsins og einstaklingsins...*” Hanus við Høgadalsá skrivaði í somu útgávu at: “*møguliga luttøka*

*okkara í felagsmarknaðinum fer at forkoma okkum sum tjóð..."*

Eisini Fólkaflokkurin vildi vera við, at gjørdist Danmark limur í EF, so máttu Føroyar fylgja við, tí statsrættarliga støðan var sum hon var. Knút Wang segði 28. oktober 1970 í Dagblaðnum: *"Fyrstu ferð spurningurin um limaskap í EFTA ella EF var frammi kom spurningurin til viðgerðar í eini sokallaðari marknaðarnevnd, har eg møtti á einum fundi fyri Fólkaflokkin. Tá var skilliga sagt, at fór Danmark uppí EFTA, so kundu Føroyar sjálvar avgera, um vit vildu limaskap ella ikki. Og hetta hevur roynst beint. Men samstundis var skilliga undirstrikað, at so kom ikki at verða viðvíkjandi EF tí fór Danmark uppí máttu vit við galdandi statsrættarligu støðu gera tað sama."*

Eisini vildi flokkurin vera við, at EF í veruleikanum var ein hernaðarsamgonga, og tí ynskti EF so brennandi at fáa Føroyar við í sítt strategiska spæl. Dagblaðið skrivaði hin 29. januar 1972 soljóðandi: *"...hernaðarmál vóru hildin uttanfyri tingingarnar. Júst so. Men hví? Dugir Atli Dam ikki sjálvur at skilja hví, teir fimu diplomatarnir í EF goymdu hernaðarmálini? Tey koma jú ikki fyrr enn seinni. Tey koma tá tann vælsignaða umhugsunartíðin er liðug um trý ár. Tá fáa Atli Dam og allir føroyingar við honum annað at síggja. Og hvør smílist tá? Føroysku diplomatarnir? Tað er óreingiligur veruleiki, at EF er ein hernaðarsamgonga. Hetta verður tó ikki nevnt fyri hvørjum manni. Og fyri føroyingum var tað av alstórum týdningi fyri harrarnar í Brússel ikki at nevna eitt orð um hetta. Sjálvandi ikki. Teir eru jú eldhugaðir fyri at fáa Føroyar upp í felagsskapin, tí sum vit vita, so eru Føroyar av ógvuliga stórum týdningi hernaðarliga (strategiskt) sæð. Nei, vit eru ikki á veg inn í felagsmarknaðin. Vit eru komnir upp í hann."*

Sitandi andstøða var sostatt meiri EF skeptisk enn samgongan, og brúkti ræðumyndir um at tjóðin fór at ganga undir og tosaði um hernaðarsamgongu í sínum kritikki av felagsskapinum.

Dimmalætting hartaði Tjóðveldisflokkin fyri at brúka EF málið til at øsa fólk upp ímóti hinum flokkunum og segði flokkin føra valpropaganda. Eisini Sosialurin skrivaði um nógvu EF ræðumyndurnar undan valinum, sum Tjóðveldisflokkurin kom við, og skýrdi tað at vera propaganda. Sambært Dimmalætting royndi Tjóðveldisflokkurin at ræða føroyingar til løgtingsvalið við lygnum og ósannari frágreiðing um støðutakan flokkanna til málið. Trygve Samuelsen skrivaði í Dimmalætting 2. november 1970 at: *"Í staðin fyri at mæla til samanhald í hesum stóra og álvarsliga máli, hevur Tjóðveldisflokkurin tikið ta støðu ábyrgdarleyst at brúka hetta mál partapolitisk til at fiska sær nakrar fáar atkvøður til løgtingsvalið".* Sverri Skaalum skrivaði í Dimmalætting hin 5. november sama ár, at helst allir flokkar – uttan Tjóðveldisflokkurin – vóru á einum máli um at EF málið skuldi kannast gjølla áðrenn støða varð tikin fyri ella ímóti limaskapi.




*Fólkafylkingin móti EEC var sera virkin í kjakinum. Mynd: Fylkingin mai 1973.*

Samgonguflokkarnir brúktu nógva orku uppá at fortelja sínum veljarum, at teir ikki høvdu tikið nakra støðu í EF málinum og vissa veljaran um, at arbeitt varð fyri Føroya fólk. Kári D. Petersen segði í Sosialinum 14. oktober 1970, at Javnaðarflokkurin ikki tók endaliga støðu í EF málinum, fyrr enn álitið frá kanningarnevndini fyrilá. Og hann undirstrikaði, at: *"Økið innan fyri fiskimarkið verður einans fyri føroyingar"*. Eisini Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin undirstrikaðu týdningin av fiskimarkinum og at allir føroyingar stóðu saman um 12 fjórðingamarkið. Tingakrossur skrivar 27. oktober 1970 soleiðis: *"Leingi hevur 14. septembur meylað um henda spurning og rósað sær av, at teir eru teir einastu, sum hava tikið avgjørda støðu um ikki at fara upp í felagssamgonguna. Støðan hjá teimum man kortini ikki vera betri enn góð... Fiskimarkið hava vit vunnið við tógvið stríð, og tað verður ikki latið av aftur hondunum av Sjálvstýrisflokkinum."*

Møguleikin fyri at víðka enn meir um føroyska fiskimarkið, og ikki bert at varðveita teir 12 fjórðingarnar, var eisini eitt týðandi mál. Serliga møguleikarnir hjá Føroyum fyri slíkari víðkan, um Føroyar fóru uppí EF, var ofta frammi í bløðunum. Dimmalætting skrivaði hin 31. oktober 1970 at: *"... hvis Færøernes adgangsbillet til Fællesmarkedet ikke kan betales billigere end ved at give afkald paa den særlige færøske fiskerigrænse, saa modtager vi ikke tilbudet. Det standpunkt er ikke noget enkelt færøsk partis, men Færøernes overhovedet".* Eisini varð mett at føroyski heimafiskiskapurin átti at intensiverast fyri at undirstrika

rættindini til verandi fiskimark, og fyri at kunna gera sær vónir um eina víðkan.

Fólkafylkingin móti EF var sera virkin í samfelagskjakinum hesa tíðina. Hon var politiskt óheft, og aðalmál hennara var, at Føroyar ikki skuldu gerast limur í EF. Fólkafylkingin gjørdi í hesum sambandi stórt upplýsingararbeiði. Hon gav m.a. út ein bókling, ið greiddi frá EF við serligum atliti at støðu Føroya. Niðurstøðan í bóklinginum var, at um Føroyar vórðu innlimaðar í EF, so fór landið at gerast ein útjaðari. Ræðumyndin var, at frælsa kapitalistiska kappingin, ið var innan EF, vildi týna føroyska virksemið, og avtofta alt landið.

Fólkafylkingin gav eisini út blaðið Fylkingin, ið varð nýtt til at agitera ímóti føroyskum EF limaskapi. Í limatíðindum í blaðnum í desember 1972 stendur: *"Hetta blað er sjónligt tekin um, at Fólkafylkingin móti EF er farin til verka. At nýta bíðingartíðina til upplýsingararbeiði um EF. Vit vóna, at hetta verður týdningarmikið arbeiðstól í EF arbeiðinum... Fólkafylkingin móti EF er ein fylking og eingin flokkur. Hon hevur tí í syftu onki annað at savnast um, enn at limirnir siga nei til EF."*

Fólkafylkingin hevði ein sera aktivan leiklut innan rørsluna móti EF í Føroyum. Blaðið bar tíðindi og upplýsing um EF sum ein felagsskap, ið kom at týna føroyingin – og Føroyar sum tjóð. Fólkafylkingin var eisini virkin við m.a. mótmælisgongum og kjakfundum.


Týdningarmikið val

Verjið landgrunnin við at velja tjóðveldisflokkin

Tað er vánað á hægsta stað, at fara danir upp í felagsmarknaðin, so nøyðast vit at fylgja Danmørkini eftir. Við okkara stjórnarstøðu ber tað ikki til at vit standa uttan fyri EEC.

fiskavirki her og inregistrera fiskiførr her, sum kunnu veiða á jøvnum føti við okkara egnu fiskifør.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN er einasta trygd, ið fólkið

er tað tí av sonnum, tá føroyingar fara til valborðið 7. november. Her er einki minni spurningurin um lív ella deyð fyri okkum sum tjóð, ið veljarin skal

*Mynd: Fjúrtandi September 4. november 1970.*

# Embætismannanevndin

Meirilutin á tingi ynskti at fáa møguleikarnar hjá Føroyum innan EF útgreinaðar, áðrenn støða varð tikin í málinum. Í august 1970 varð ein embætismannanevnd sett at greina støðu Føroya til EF, um Danmark gjørdist limur. Í nevndini vóru embætismenn, ið umboðaðu donsku og føroysku myndugleikarnar. Teimum varð álagt at koma við eini meting innan 1. desember 1970 av fyrimunum og vansum við einum møguligum føroyskum EF-limaskapi. Nevndin skuldi greina, hvørjir trupulleikar áttu at verða loystir í samráðingunum um limaskap.

Í niðurstøðuni legði nevndin serliga dent á fiskivinnuna, sum høvuðsvansan við føroyskum limaskapi. Nevndin undirstrikaði, at álvarsamasta ásetingin í felags fiskivinnupolitikkinum hjá EF var, at øll limalondini innan felagsskapin fingu atgongd til føroyska fiskiøkið, um Føroyar gjørdust limur. Hetta vildi m.a. føra við sær størri vanda fyri ovurfiskiskapi. Trupulleikin var serliga, at føroyingar ikki høvdu eina alternativa vinnu at halda seg til, um fiskiskapurin minkaði. Tískil var nevndin bangin fyri, at avleiðingin í seinna enda eisini fór at vera fráflyting. Harafturímóti metti nevndin, at felags fiskivinnupolitiska ásetingin um innflutning frá triðjalondum kundi hava við sær ein støðugari prís og harvið eisini eina meiri *støðuga* fiskivinnu.

Nevndin setti fram tveir møguleikar fyri framtíðar samstarvi Føroya við EF:

Limaskap í felagsskapinum saman við Danmark, við teimum undantøkum ella serskipanum, sum kundu fáast gjøgnum samráðingarnar.

Eitt annað slag av tilknýti ella samstarvi, har nærri definitiónin av tilknýti mátti fáast til vega gjøgnum samráðingar.

Nevndin segði seg ikki kunna taka støðu til, hvør av teimum báðum møguleikunum var betra loysnin fyri Føroyar. Tað avgerandi var, at samráðingarnar í báðum førum máttu innibera somu spurningar og tískil átti samráðingaruppleggið ikki at útiloka nakran møguleika. Nevndin mælti síðani til, at heimastýrið samtykti, at Danmark, saman við teirri neyðugu føroysku umboðanini, fóru í samráðingar við EF við tí fyri eyga at fáa greiðu á hesum høvuðsspurningum:

1. Einkarrætt at veiða innanfyri fiskimarkið.
2. Prísásetingarskipan á fiski.
3. Stuðul til landbúnaðin.
4. Tollfrían innflutning av salti úr Spania.
5. Stuðul til endurnýggjan av skipaflotanum.
6. Stuðul til skipasmiðjur.

7. Prísískoyti til fiskaprísin.
8. Einkarrætt hjá tryggingini.

# Andstøða móti samgongu

17. desember 1970 legði Atli P. Dam, løgmaður, fram uppskot til samtyktar um, at ríkisstýrið saman við umboðum fyri landsstýrið skuldi fara undir samráðingar við EF um, undir hvørjum treytum Føroyar kundu luttaka ella samstarva við felagsskapin. Tá úrslitið av samráðingunum fyrilá, skuldi málið aftur leggjast fyri løgtingið. Undir viðgerðini av málinum sóust týðiliga hugsanirnar hjá teimum ymsu flokkunum um felagsskapin.

Samgonguflokkarnir (Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin) greiddu frá, at flokkarnir, ið myndaðu landsstýrið, frammanundan valinum í 1970 høvdu ta støðu, at tað ikki var beint at binda seg til nakra avgerð um - ella á hvønn hátt - Føroyar skuldu vera við í felagsskapinum ella samstarva við hann. Meirilutin segði í sínum viðmerkingum soleiðis um EF samráðingarnar: *"Málið er uttan iva eitt tað týdningarmesta, sum løgtingið enn hevur havt til viðgerðar, og avleiðingarnar eru tí uttan mun til, hvør avgerðin so verður, av allarstørsta týdningi fyri land og fólk okkara".* Tí undirstrikaðu samgonguflokkarnir, at tað var skeivt, at taka støðu fyri ella ímóti limaskapi, áðrenn málið var kannað og samráðingar við EF høvdu verið um málið.

Í viðmerkingunum hjá Hanusi við Høgadalsá og Erlendi Paturssyni úr Tjóðveldisflokkinum til uppskotið til samtyktar frá løgmanni, varð dentur enn einaferð lagdur á, at vandi var fyri, at luttøka Føroya í EF fór at forkoma føroyingum sum tjóð. Í sínum viðmerkingum søgdu teir: *"Vissuliga liva vit sum ófrælst hjálandafólk í dag - og tað eru tey, ið halda, at verri verður tað so aldri. Men, her er tó ymiskt, sum vert er at hava hugfast. Tann ófrælsa støða, vit hava sum danskur ríkislutur, kann uppsigast og avtakast. Men hann, ið fyrst er farin upp í felagsmarknaðin, sleppur ongantíð haðan aftur. Sáttmálin er óuppsigiligur og hevur óavmarkað gildi í tíð. Fara vit so upp í henda felagsskap, so er læst og bundið fyri alt okkara frælsið í framtíðini."*

Hanus við Høgadalsá og Erlendur Patursson mæltu til, at landsstýrið ikki samráddist um møguligan limaskap, men heldur skuldi biðja ríkisstjórnina taka aftur ynski sítt um føroyskan EF limaskap. Landsstýrið skuldi so heldur samráðast um møguligt samstarv við EF.

Fólkaflokkurin lovaði undan valinum, at fólkið skuldi vera við til at gera av, hvørt Føroyar skuldu gerast EF-limur ella ei – við einum løgtingsvali. Í staðin




Landsstýrið hevur lagt uppskot til samtyktar á ting.
Í hesum uppskoti vrakar landsstýrið tær luttøkutreytir, sum vóru úrslitið av samráðingunum í Bruxelles um ársskiftið 1971 - 1972.
Fólkafylkingin metir vrakan landsstýrisins sum ein sigur fyri andstøðuna móti EEC, men vísir samstundis á, at tað er heldur ógreitt, hvat landsstýrið ætlar sær, og at tað enn tykist, sum at samgongan hevur mestan hug at leita upp í EEC.

**HEVUR LANDSSTÝRIÐ SKIFT STØÐU Í EEC-MÁLINUM ?**

*Mynd: Fylkingin apríl 1973*

fyri uppskotið hjá Landsstýrinum mælti Hákun Djurhuus til, at farið varð undir samráðingar við EF um tilknýti Føroya, við tí í hyggju at tryggja Føroyum somu handilsligu sømdir innan felagsmarknaðin, ið Føroyar høvdu sum limur í EFTA - og frían landingarrætt fyri feskan fisk.

Viðmerkingarnar hjá Fólkaflokkinum vísa, at hann var meiri skeptiskur mótvegis EF enn samgongan. Hákun Djurhuus segði m.a. soleiðis í sínum viðmerkingum til uppskotið: *"(Fólka)flokkurin mælti til varsemi og vísti á vissar vansar, ið kundu koma at roynast okkum dýrir, um her varð tikin støða fram eftir fummum, og vit komu við vilja ella av óvart at fremja leik, ið kundi føra við sær, at "borðið fangaði", so vit av gáloysni komu í eina avleiðingarstøðu, ið bæði kundi ført okkum móti einum fíggjarligum og politiskum stavnhaldi, ið ikki var okkum at gagni sum føroyingar sum tjóð".*

Uppskotið frá løgmanni um at ríkisstýrið saman við umboðum fyri landsstýrið skuldi fara undir samráðingar við EF, varð samtykt í 1971 við 14 atkvøðum fyri og 6 ímóti – 6 tinglimir atkvøddu ikki. Nú kundu samráðingarnar byrja.

# Samráðingarnar

Samráðingarnar um føroyskan limaskap byrjaðu formliga 2. mars 1971, tá løgmaður var á fundi í Brússel við hini EF londini. Har greiddi hann frá aðalspurningunum í sambandi við møguligt tilknýti hjá Føroyum saman við Danmark innan EF.

Á fundinum helt løgmaður eina røðu, har hann undirstrikaði, at føroyski búskapurin var treytaður av fiskivinnuni. Føroyingar vildu hava eina loysn við hini EF londini um at varðveita einkarrættin hjá føroyskum fiskimonnum at fiska innanfyri føroyska fiskimarkið. Hann greiddi frá, at tað í Føroyum var ótti fyri, at felags fiskivinnupolitikkurin hjá EF fór at hava við sær at føroyingar, ið livdu av sjónum, vórðu noyddir at finna sær annað livibreyð og sostatt fóru at flýggja av landinum.

Løgmaður undirstrikaði, at stór afturgongd í heimafiskiskapinum fór at fáa ógvusligar avleiðingar fyri føroyska búskapin. Og tað var júst hetta, ið ótti var fyri fór at henda, um Føroyar gjørdust partur av EF – nevniliga at útlendsk skip skuldu fáa atgongd til heimafiskiskapin, so minni partur var til føroyingar at fiska.

Løgmaður bar í síni røðu fram serliga trý viðurskifti, ið føroyingar vildu hava greiðu á, áðrenn støða varð tikin til limaskapin:

Um tað var til at fáa eina tariffkvotu fyri tað serliga slagið av sponskum salti, sum varð mett at verða ein treyt fyri góðu góðskuna av saltfiski, ið føroyingar virkaðu.

Um tað fór at bera til framhaldandi at stuðla føroysku bóndunum.

Um ein nøktandi loysn fyri føroysku fiskivinnuna kundi finnast innanfyri reglurnar fyri felags fiskivinnupolitikkin.

Í frágreiðing síni á ólavsøku í 1971 undirstrikaði løgmaður, at ongin støða varð tikin fyrrenn allir møguleikar vóru kannaðir: *"Landsstýrið ætlar ikki at taka óráð fyri og ætlar ikki at førka fótin, fyrrenn vit eru í tryggari torvu, og eingin annar enn føroyingar sjálvir skulu taka endaligu avgerðina."* Løgmaður legði dent á, at tað *var* fastsligið, at Føroyar kundu standa uttanfyri um Danmark fór uppí felagsskapin, og at ongin annar enn føroyingar sjálvir skuldu avgera hvørt farið varð uppí ella ikki.

Á ráðharrafundi í Brússel í desember 1971 samdust Bretland, Írland og Danmark við EF um veiðirættindi innan fyri fiskimark hjá luttakaralondunum. Semjan bar í sær, at limalondini í 10 ár varðveittu rættin til einans at loyva egnum fiskiskipum at fiska innanfyri 6 fjórðingar. Fyri limalond, har fiskivinnan hevði serligan týdning, skuldi einkarrætturin eisini galda í 10 ár, men innanfyri 12 fjórðingar. Eftir hesi 10 árini skuldi




*Mynd: Fylkingin januar 1973*

EF kommissiónin geva EF-Ráðnum eina frágreiðing um sosialu og búskaparligu viðurskiftini í økjunum, sum høvdu hesa serstøðu. Serligur dentur skuldi leggjast á, um fiskivinnan av geografiskum orsøkum eftir hetta 10 ára skeið framvegis var ein týdningarmikil vinnugrein. Noreg luttók ikki í semjuni á ráðharrafundinum. Noreg og EF komu ikki ásamt um, hvussu stórur partur av 12 fjórðingaøkinum skuldi koma inn undir 12 fjórðinga serregluna. Noreg helt heldur ikki orðingina um hvat skuldi vera galdandi eftir 10 ára skeiðið vera nóg góða trygd fyri framhaldandi einkarrætti til fiskiskap innanfyri 12 fjórðingar.

Samráðingarnar við EF endaðu við, at Føroyar fingu eina umhugsunartíð á 3 ár, soleiðis at landsstýrið í seinasta lagi 31. desember 1975 skuldi boða frá, hvørt Føroyar ynsktu limaskap. Í umhugsunartíðini høvdu Føroyar somu støðu sum onnur ikki-limalond.

Sosialurin skrivaði 12. januar 1972, at við hesum samráðingarúrsliti komu Føroyar í hvussu er at standa fyribils uttanfyri, tó so at handilin við Danmark kundi halda áfram sum áður. Undir yvirskriftini “*Vit eru innlimaðir í EF*” skrivaði Dagblaðið 29. januar sama ár, at Føroyar ikki vóru á veg inn í EF, men longu vóru limir. Fólkaflokkurin trýsti eisini á at fáa samgonguna at melda út, hvørja støðu hon hevði í málinum.

Í frágreiðing síni á ólavsøku 1972 segði løgmaður: *“Men hann fær byr, ið bíðar og havn ið rør, og hetta er júst, hvat vit hava útvegað okkum møguleika fyri. Vit bíða,*

*men vit rógva samstundis undir land."* Hann undirstrikaði, at bíðitíðin skuldi nýtast til at ávirka tann byr, ið føroyska samfelagið framyvir hevði tørv á. Hann undirstrikaði, at munurin á at fyrireika at fara uppí og at fyrireika at standa uttanfyri ikki var stórur, og tí vildi landsstýrið nýta bíðitíðina til landsins besta.

Í 1972 flutti Ísland sítt fiskimark út á 50 fjórðingar. Fyri at tann flotin, ið nú var trokaður út av íslendsku grunnunum – serliga tann bretski – ikki skuldi leggjast á føroysku grunnarnar ístaðin, fluttu føroyingar sítt fiskimark út á 200 fjórðingar í 1975.

## Løgtingið sigur nei til føroyskan EF limaskap

2. oktober 1972 varð staðfest við fólkaatkvøðu, at Danmark skuldi gerast partur av EF. Danski upptøkusáttmálin í EF fevndi ikki um Føroyar. Eisini Bretland og Írland valdu at gerast limir. Sambært ráðgevandi fólkaatkvøðu í Noregi, har meirilutin av fólkinum var ímóti limaskapi, avgjørdi norska stjórnin at mæla stórtinginum til ikki at samtykkja luttøku í EF.

Síðani løgtingið í januar 1972 hevði viðgjørt EF málið vóru nú farnar hendingar fram av stórum týdningi fyri støðu Føroya mótvegis EF. EFTA londini, sum ikki søktu um limaskap í EF, høvdu øll fingið fríhandilssáttmálar við EF; og Noreg ynskti ikki longur limaskap, men samráddist nú við EF um fríhandilssáttmála.

Viðurskiftini millum EF og ávikavist Ísland og Noreg, sum vóru stórframleiðarar og stórútflytarar av fiski og fiskavørum til EF, vigaði sjálvandi tungt í støðutakanini um møguligan limaskap. At Noreg ikki gjørdist limur, bar eisini í sær, at tað - í víðkaða EF - neyvan fór at vera yvirskotsframleiðsla av saltfiski og frystum fløkum, sum var høvuðsútflutningsvøra Føroya.

Víðkanin av íslendska fiskimarkinum, menningin sum heild viðvíkjandi fiski-rættindum og veiðumøguleikunum í Norðuratlantshavi, og Noregs nei til lima-skap bar í sær, at fyrimunir og vansar við føroyskum EF-limaskapi vóru munandi broyttir. Nýggja støðan gjørdi seg serliga galdandi viðvíkjandi týdninginum fyri Føroyar av táverandi fiskirættindareglum hjá EF, hvørs krav um ikki at gera mun millum rættindi hjá EF-skipum uttan fyri 12 fjórðingar, ikki samsvaraði við føroysk áhugamál. Landsstýrið metti, at hesar fiskirættindarreglur ikki vóru nóg góðar sømdir fyri føroyskan fiskiskap undir Føroyum. Men út frá einum útflutningssjónarmiði helt landsstýrið ongan iva vera um, at føroysk áhugamál høvdu verið betur røkt við EF-limaskapi.

Niðurstøðan hjá landsstýrinum var sostatt, at grundarlagið undir føroyskari luttøku í EF ikki var nøktandi, serstakliga orsakað av reglunum um fiskirættindi. 13. mars



LEYSASØLA: 1 KR.

SOSIALURIN

FRÆLSI – JAVNAÐUR – BRØÐRALAG

NR. 28 MIKUDAGIN 14. MARS 1973 46. ÁRG.

# LANDSSTÝRIÐ VRAKAR VERANDI EF-TREYTIR

**Landsstýrið heldur ikki, at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum, serliga hvat fiskirættindum viðvíkur, er ráðilig, men heldur tó, at út frá einum útflutningssjónarmiði er ongin ivingur um, at okkara áhugamál í so máta tala fyri luttøku**

**Løgmaður lagt fram uppskot til samtyktar í Felagsmarknaðarmálinum**

Framhald á 7. síðu (1)

## Skeljavirki í Hvalba

**Skeljaveiðan av, men byrjar aftur í heyst**

Mynd: Sosialurin 14. mars 1973.

1973 legði løgmaður tí fram hetta uppskot til samtyktar, ið varð samtykt við 14 atkvøðum fyri og 12 ímóti:

Løgtingið ásannar, at útflytingin av íslendska fiskimarkinum, at havnan Noregs av limaskapi í EF og at versnandi veiðumøguleikar í Norðuratlantshavinum fyri føroysk fiskifør sum heild bera í sær, at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum, serliga hvat fiskirættindum viðvíkur, ikki er ráðilig.

Landsstýrinum verður álagt at gera sítt til, at EF´s reglur um fiskirættindi verða broyttar, so tær betri samsvara tørvinum hjá økjum og londum, har fiskivinnan er av avgerandi týdningi og aðrir vinnumøguleikar avmarkaðir. Landsstýrið leggur fyri løgtingið frágreiðing um tey tiltøk, sum tikin verða í so máta.

Landsstýrinum verður álagt at kanna møguleikarnar fyri serskipan við EF um føroyskan útflutning.

Málið um føroyskan EF limaskap varð endaliga avgreitt, tá ið eitt samt løgting í 1974 gjørdi av, at Føroyar skuldu standa uttanfyri, hóast Danmark var farið inn í felagsskapin.

Føroyingar fingu ikki møguleika at velja, um Føroyar skuldu halda fram í EFTA, og politiskt høvdu føroyingar at donsku stjórnini fyri mannagongdina í málinum. Í Føroyum skilti marknaðarnevndin heimastýrislógina soleiðis, at avgerðin átti at verið løgd fyri heimastýrið, áðrenn endalig støða varð tikin av ríkismyndugleikunum í málinum.

Í 1974 var sostatt greitt at Føroyar vóru uttanfyri EFTA og uttanfyri EF, men framvegis partur av ríkisfelagsskapinum.

# 3. PARTUR
# Áland í ES

## Áland valdi innara vegin

**Álendsku royndirnar sýna, at tað við góðum fyrireikingum ber til at fáa undantøk frá grundleggjandi ES-prinsippum og stórar fyrimunir, hóast farið verður upp í ES saman við einum størri landi. At vera ein sera lítil partur av so stórum felagsskapi hevur eisini sínar greiðu vansar, men kanska eru tað líka nógv viðurskiftini við Finnland, sum í dag avmarka møguleikarnar við limaskapinum**

Áland gjørdist saman við Finnlandi limur í ES 1. januar í 1995.

Hetta var endin á einari langari tilgongd, har Áland endaliga valdi at standa saman við Finnlandi og Svøríki.

ES-tilgongdin kann metast at vera byrjað í 1917, tá Finnland gjørdist sjálvstøðugur statur.

Bretar vóru eftir fyrra veraldarbardaga bangnir fyri, hvussu strategisku týdningarmiklu oyggjarnar í Eystursjónum fóru at verða brúktar, nú Finnland ikki longur var partur av Russlandi. Tí legði Bretland spurningin fyri nýstovnaðu Fólkasamgonguna, sum skuldi arbeiða fyri friði og stabiliteti í Evropa.

Álendska fólkið vildi í hesi viðgerðini gerast partur av Svøríki, meðan Finnland bert vildi geva álendingum eitt sera avmarkað sjálvstýri inni í finska ríkinum.

Úrslitið gjørdist í 1921, at bæði finnar og álendingar fingu eitt sindur av sínum vilja. Áland gjørdist nevniliga ein rættiliga sjálvstýrandi partur av Finnlandi.

Bæði í finska stjórnarrættinum og í fólkarættinum varð staðfest, at staðbundnir siðir og svenska málið skuldu varðveitast á oyggjunum. Harafturat skrivaðu tíggju Evropeisk lond undir uppá, at Áland skuldi vera eitt demilitariserað øki. Russland skrivaði ikki undir, men hevði longu einsíðugt staðfest ikki at hava hernaðarligt virksemi á Álandi, eins og seinni gjørdar avtalur, sum Russland er partur av, hava serligar ásetingar um Áland.



*Harry Jansson, sum nú umboðar flokkin Åländsk Center í álendska Løgtinginum, var millum høvuðspersónarnar, tá Áland samráddist um treytirnar fyri álendskum limaskapi í ES. Tað eydnaðist at fáa øll høvuðsynskini ígjøgnum uttan eitt: At Áland skuldi fáa ein av ES-parlamentslimum Finnlands*

Longu í 1920 høvdu álendingar fingið eina serliga sjálvstýrisavtalu í boði frá finnum, men hesa góðtóku teir ikki. Eftir nakrar broytingar, sum serliga snúðu seg um ognarrætt og rættin til at fara á val, góðtóku álendingar sjálvstýrisavtaluna, sum kom í gildi 9. juni 1922. Avtalan er síðan endurskoðað tvær ferðir, og arbeiði at endurskoða hana eina ferð afturat er í gongd.

Eftir 1922 hendi ikki so øgiliga nógv við ríkisrættarligu støðuni ella í Finnlandi, sum kundi ávirka Áland. Men í 1989 gjørdist veruliga greitt, at Finnland hugdi vestureftir. Landið gjørdist partur av Evroparáðnum og byrjaði samráðingar um at gerast partur av EBS-samstarvinum.

Eftir hetta tók tilgongdin hjá Finnlandi dik á seg, og longu í 1992 byrjaðu samráðingar um at gerast partur av ES.

Áland hevði nú tveir møguleikar. Annaðhvørt at fylgja Finnlandi í tilgongdini ímóti ES-limaskapi – tann sokallaði innari vegurin – ella at standa uttanfyri sum partur av einum stati, sum ætlaði sær upp í ES – tann sokallaði uttari vegurin – sum millum onnur Føroyar valdu. Áland endaði við at velja innara vegin.

Álendingar skuldu tvær ferðir atkvøða um ES-limaskap. Einaferð sum ein landslutur í Finnlandi, tá alt Finnland atkvøddi, og einaferð fyri at lima Áland inn í ES.

16. oktober i 1994, tá fyrra fólkaatkvøðan varð hildin, søgdu 51,9 prosent av álendingunum á vali seg vera fyri ES limaskapi, meðan 48,1 prosent søgdu seg vera ímóti. Hetta var minni undirtøka enn á meginlandinum í Finnlandi, har 57,0 prosent søgdu

seg vera fyri limaskapi, meðan 43.0 prosent atkvøddu ímóti.

Seinna atkvøðugreiðslan varð hildin eftir, at Svøríki hevði atkvøtt fyri at fara upp í ES, og Finnland longu var væl á veg uppí. Álendingar skuldu tí 20. november 1994 gera av, um teir vildu fara upp í ES við teimum treytum, sum lógu á borðinum, ella um teir skuldu standa uttanfyri, meðan Svøríki og Finnland fóru uppí.

Hesaferð valdu álendingar greitt at gera sum stóru londini, ið oyggjasamfelagið hevði mest samband við. Heili 73,6 prosent av teimum, sum atkvøddu, vóru nú fyri ES limaskapi, meðan bara 26,4 prosent vóru ímóti.

Stutt eftir, 2. desember 1994, atkvøddu 26 av teimum 30 tinglimunum í Álandi fyri limaskapi, og so kundi Finnland endaliga kunngera, at eisini Áland kom upp í ES.

## Samráðingarnar

Sum útgangsstøði eru tað bara statir, sum kunnu vera limir í ES og harvið eisini kunnu vera samráðingarpartar, tá eitt land skal upp í ES. Hetta gjørdi støðuna hjá Álandi rættiliga serliga, tí sambært álendsku sjálvstýrislógini, mátti Áland sjálvt gera av, um tað skuldi melda seg í ES.

Hesin løgfrøðiligi spurningurin varð ongantíð veruliga loystur, men ein pragmatisk loysn varð funnin, við støði í føroyska modellinum, har avgerðin um ES-limaskap varð tikin, eftir at Danmark var farið uppí.

Hetta hevði eisini í samband við sjálvar samráðingarnar við sær, at Áland samráddist ígjøgnum Finnland. Tí var fyrsta takið at fáa finnar at góðtaka álendska uppleggið.

Hetta vísti seg at vera lættari sagt enn gjørt, og fyrsta árið í samráðingunum fór við at royna at sannføra finnar um, at ES fór at góðtaka ynskini hjá álendingum. Hetta bar at enda til, og so gekk ikki meira enn hálvt ár til ES góðtók krøvini.

Tað lætti í hesum seinasta partinum nógv um, at álendingar alla tíðina høvdu havt lobbyistar í Brússel.

## Undantøkini

Hóast álendingar kundu enda í einari støðu, har størstu marknaðirnir og samstarvsfelagarnir, Finnland og Svøríki, fóru upp í ES, og Áland kundi koma at standa einsamalt, vóru álendingar ikki smædnir at seta ES krøv um limaskapin.




*Sagt verður at brennievnið hjá Álendska búskapinum er tollfrítt brennivín, og hóast tað gekk beint ímóti eini av grundreglunum í ES, slapp Áland at varðveita rættin til tollfría sølu*

**Høvuðskrøvini vóru hesi:**

- At Áland helt fram at vera neutralt og demilitariserað.
- At sjálvstýrisavtalan við Finnland varð vird, soleiðis at álendingar framvegis kundu velja til egið parlament.
- At tað framhaldandi fór at bera til at keypa tax-free vørur á skipum, ið komu til Álands, hóast ES var um at gerast eitt skattasamveldi.
- At bert fólk við álendskum heimarætti (hembygdsrätt) – ið kann fáast við at búgva í Álandi í 5 ár, hava finskan ríkisborgararætt og at duga svenskt – kundu keypa fastogn, reka vinnuligt virksemi og velja til álendska løgtingið.
- At fáa egið tingfólk í Evropatingið.

Tað vísti seg at ganga heilt væl at fáa krøvini uppfylt. Spurningurin um egið parlament var ikki nakað, sum var regulerað av ES-lóggávu, og flestu av hinum undantøkunum

komu ígjøgnum sum varandi undantøk í protokol nummar 2, sum er partur av innlimingaravtaluni hjá Finnlandi. Hetta bar til, hóast fleiri av undantøkunum – serliga skattaundantakið, rætturin at keypa fastogn og rætturin at reka vinnuligt virksemi – ganga beint ímóti grundhugsanini í ES.

Einasta høvuðskravið, sum ikki varð gingið á møti, var spurningurin um ES-parlamentslimin, sum álendingar framvegis royna at fáa. Orsøkin til, at tað ikki bar til, var millum annað, at limaskapurin næstan var vissur, tá parlamentslimurin kom á samráðingarborðið.

Summi vilja eisini vera við, at finsku flokkarnir longu høvdu býtt teir finsku Evropatinglimirnar ímillum sín, og tí bar ikki til hjá álendingum at fáa finnar at góðtaka, at Áland fekk ein av teimum 13 parlamentslimunum, sum Finnland fekk í sín part.

Tað undraði í veruleikanum álendingar, at tað skuldi ganga so væl við samráðingunum, tí spurningurin varð ofta settur: “Hvat kann Áland geva ES?”

Álendingar viðurkenna blankt, at teir sum so ikki høvdu nakað náttúruríkidømi ella líknandi at bjóða ES. Veruliga svarið uppá áhugan hjá ES fyri Álandi meta teir hinvegin vera, at samveldið helst ikki vildi hava eitt øki mitt ímillum tvey limalond, sum ES ikki hevði nakað ræði á, og tí skjótt til dømis kundi ment seg til eitt veruligt skattaskjól.

## Skattaundantakið

“Motorurin í álendska búskapinum eru ferjur, og brennievnið er óskattað brennivín”.

Hendan orðingin er blivin brúkt um týdningin av, at Áland fekk møguleika fyri framhaldandi at kunna selja tax-free vørur umborð á ferjunum.

Júst hvussu stórur týdningurin var av hesi vinnu, tá Áland fór uppí, er torført at fáa eitt endaligt svar uppá, men 45 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni hevur verið nevnt. Sambært nýggjastu tølunum er beinleiðis týdningurin av skattaundantakinum umleið helvtina so stórur. Harafturat kemur eisini nógv avleitt virksemi av hesi vinnu, sum neyvan hevði verið so stór, um Áland ikki fekk hetta undantakið.

Tað skerst tí ikki burtur, at tað var sera týdningarmikið at fáa hetta tax-free undantakið, sum er ein av høvuðsorsøkunum til, at Áland hevur havt búskaparligt yvirskot av at vera við í ES. Tax-free skipanin varð annars avtikin í flestu økjunum í ES 1. juli í 1999.

Reint praktiskt merkir undantakið, at skulu skip, sum til dømis ferðast millum

Finnland og Svøríki ella baltisku londini, selja tax-free umborð, so skulu tey leggja at landi í Álandi. Hetta hevur havt við sær, at tað í dag eru umleið 60 fráferðir við ferjum úr Álandi um vikuna.

Tax-free sølan er høvuðsinntøkan hjá ferjunum, og tí verður sjálvur ferðaseðlakostnaðurin sera lítil. Tað kostar til dømis umleið 10 evrur at koma úr Svøríki til Álands.

Tað er tó ásett í ES lóggávuni, at Áland ikki skal útnytta hesa skipanina, og hóast tað er ein eitt sindur løgin orðing, so meta álendingar, at tað er avgerandi ikki at royna at toyggja undantakið ov nógv, tí tað kann hava við sær, at tað verður tikið frá teimum.

Í upprunaligu samráðingunum um skattaundantakið gjørdist greitt, at tað ikki bar til at gera eitt undantak, sum bert snúði seg um keypið umborð á ferjunum, og tí gjørdist loysnin, at Áland var uttanfyri alt, sum kann nevnast óbeinleiðis skattir. Áland er hinvegin partur av tollsamveldinum.

Hetta hevur millum annað við sær, at postverkið á Álandi er vorðin ein stór fyritøka. Um pakkar fyri undir 10 evrur verða sendir innanfyri ES, so ber nevniliga til at sleppa undan meirvirðisgjaldinum, um pakkarnir verða sendir úr Álandi. Hetta hevur við sær, at nógvar fyritøkur sum selja smáar lutir – serliga bløð – senda pakkar hagani. Tí hevur Áland í dag eitt postverk við umleið 250 starvsfólkum og ein umsetning uppá umleið 300 milliónir krónur. Ætlanir eru eisini um at víðka virksemið. Til samanberingar hevði Posta í 2011 umleið 150 ársverk og ein umsetning uppá umleið 90 milliónir krónur.

Hóast skattaundantakið sum heild hevur verið ein stórur fyrimunur, so hevur tað ávísar trupulleikar við sær, tá tað snýr seg um meirvirðisgjald.

Áland er partur av finsku skattaskipanini, so tá álendingar innflyta vørur úr øðrum ES londum, skal meirvirðisgjaldið fyrst takast av, og síðani skal finskt meirvirðisgjald leggjast á. Tað sama er sjálvsagt eisini galdandi hinvegin. Hetta skapar meira umsiting, og tað er nakað, sum serliga tyngir smærru fyritøkurnar í Álandi. Tað er sera vanligt hjá álendingum at hava egna fyritøku – tað eru einar 2.500 fyritøkur í Álandi, og har búgva umleið 28.000 fólk – so hetta er ein eyka umsiting, sum rakar rættiliga nógvar álendingar.

Hetta er ein trupulleiki, sum álendingar eftir hondini hava vant seg við. Men almenna uppfatanin í Álandi er, at fekk sjálvstýrandi økið egna lóggávu um meirvirðisgjald, so hevði hetta lætt um umsitingina, tí ofta tykist trupult hjá útlendingum at skilja, at Álandi ikki er heilt tað sama sum Finnland á hesum øki.

## Heimarætturin

Serliga álendska hembygdsrätt-undantakið sigur, at tað bert eru fólk við hesum serliga heimarætti, ið sum útgangsstøði kunnu eiga fastogn og reka vinnuligt virksemi í Álandi. Harumframt er hembygdsrätt eitt krav fyri valrætti og valbæri í Álandi.

Grundarlagið undir hesu sermerktu og – at síggja til – tungu skipan, er eitt ynski um at verja álendska identitetin. Tað kann sigast vera ein partur av teirri fatan, sum varð skapt, tá Áland gjørdist partur av Finnlandi.

Umframt at gera av, hvør kann reka vinnuligt virksemi (minst 2/3 av nevndini í feløgum skal hava hembygdsrätt) og eiga fastogn, so sleppa fólk við hembygdsrätt undan finskari hertænastu.

Avmarkingarnar hjá fólki uttan hembygdsrätt at keypa fastogn og at reka vinnuligt virksemi eru tó í praksis blivnar minni seinastu árini. Undantøkini verða nevniliga brúkt oftari og oftari. Er tað til dømis soleiðis, at ein hevur starv í Álandi ella á annan hátt prógvar, at ein ætlar at búgva har, so fæst í allar flestu førum undantak til at keypa sær ein bústað. Tí kann sigast, at undantakið frá ES viðvíkjandi keypi av fastogn serliga verður brúkt til at fyribyrgja, at ov nógvir útlendingar keypa sær summarhús. Men eisini her verða undantøk gjørd, og til dømis hevur eitt svenskt samtak keypt eitt stórt frítíðarøki.

Viðvíkjandi rættinum at dríva vinnuligt virksemi eru álendingar ójavnir á máli um, hvussu stóra ávirkan hetta øki hevur í dag. Øll eru samd um, at hetta forðar fyri

### Soleiðis fæst hembygdsrätt

Øll, ið áðrenn 1952 høvdu finskan ríkisborgararætt og høvdu búð 5 ár út í eitt í Álandi fingu hembygdsrätt. Síðan hevur hetta verið galdandi fyri øll undir 18 ár, ið hava finskan ríkisborgararætt, eru fastbúgvandi á Álandi og har minst annað foreldrið hevur hembygdsrätt. Onnur kunnu søkja um hembygdsrätt, um tey hava finskan ríkisborgararætt, hava búð í Álandi í 5 ár og kunnu prógva, at tey duga svenskt. Álendska stjórnin kann tó gera undantøk, og kortini veita hembygdsrätt.

Býrt tú hinvegin ikki í Álandi í 5 fylgjandi ár, so missir tú hesi rættindi, og mást søkja av nýggjum, um rætturin skal vinnast aftur. Álendingar eru í dag eitt sindur misnøgdir við, at finskur ríkisborgararættur krevst fyri at fáa heimarætt í Álandi, tí hetta gevur finnum ein fyrimun fram um onnur fólkasløg at gerast ein fullgildigur partur av álendska samfelagnum.

íløgum úr øðrum londum. Nøkur meta tó, at skipanin mest hevur fingið ringt orð á seg, men í veruleikanum ikki er nøkur forðing við teimum undantøkum, sum verða givin. Onnur meta hinvegin, at skipanin í sær sjálvum er ein stór forðing fyri íløgum úr øðrum londum.

# Óvæntaðar avleiðingar

"Eg hevði eitt verkstað til motorsúkklur og velti eplir. Støðan var soleiðis tá, at eg innflutti eykalutir úr Finnlandi, og roknaði við at kunna innflyta teir bíligari úr øðrum ES londum. Samstundis roknaði eg eisini við, at eplir í stórum nøgdum fóru at koma til Álands úr Evropa, so eg ikki longur var kappingarførur við mínum eplum. Tað vísti seg at vera púra umvent. Álendsku eplini blivu ein delikatessa, sum vit útflyta í stórum mongdum, meðan eykalutirnir til motorsúkklurnar framvegis verða innfluttir úr Finnlandi, tí tað eru so nógvir trupulleikar við meirvirðisgjaldinum, tá vit innflyta úr øðrum londum."

Soleiðis lýsti ein vinnulívsmaður út frá sínari egnu støðu, hvussu torført tað í veruleikanum var at gjøgnumskoða, hvørjar avleiðingar ES-limaskapurin fór at fáa.

Størsta óvæntaða positiva fylgjan gjørdist, sum nevnt, at postverkið í Álandi fekk úr at gera.

Hinvegin komu serliga tríggjar óvæntaðar avleiðingar, sum álendingar eru keddir um:

- Trupulleikarnir av óbeinleiðis skattinum.
- Forboð at selja snús
- Forboð at veiða fleiri fuglasløg

Harafturat eru fleiri frustratiónir um mongdina av detaljustýring, sum ES vil hava – og serliga dupultmoralurin, sum ofta er í hesi stýring. Til dømis undrast nógvir álendingar á, at tað skal vera loyvi til at roykja og keypa hash í Hollandi, og tað ikki skal vera loyvt at keypa snús í Álandi.

Forboðið at selja snús hevur verið ein av orsøkunum til, at ferjur eru útflaggaðar til Svøríkis, sum hevur eitt serligt ES-undantak at selja snús. Álendingar eru tó ikki givnir at snúsa. Tað verður bara keypt umborð á svensku ferjunum í staðin.

Tá talan er um fuglaveiðuna, so hevur ein mentan verið, at um várið – meðan fuglarnir nørast – hava álendingar veitt eini átta fuglasløg, sum bert eru í Álandi hesa árstíð. Hetta er nú í stóran mun bannað av ES, so tað í løtuni bert er loyvt at veiða eitt fuglaslag.

Sambært álendingum er hendan veiðan farin fram í nógv ættarlið, uttan at tað hevur minkað um stovnin, og tí hava teir ilt við at skilja, at ES ikki vil góðtaka veiðuna. Teir greiða somuleiðis frá, at tað serliga er djóraverndarfelagsskapurin "Birdlife", sum er orsøkin til bannið av veiðuni. Ein útlegði støðuna soleiðis: "Tá ein so stórur áhugafelagsskapur við so nógvum lobbyistum vil hava okkurt ígjøgnum í ES, so kemur tað ígjøgnum, óansæð um tað er rætt at gera ella ikki. Við okkara avmarkaðu umboðan í ES, hava vit ongan møguleika at fáa veruligu støðuna fram."

# ES og ávirkan

Ein partur av trupulleikanum við fuglaveiðuni er, at álendingar ikki sjálvir kunnu vera umboðaðir, tá mál verða førd í ES-dómstólinum ímóti Álandi. Tað er Finnland, sum verður lagt undir at bróta ES-lóggávuna, og hetta hevur, sambært nógvum álendingum, við sær, at tað er torført at fáa álendsku sjónarmiðini fram. Onkur fer so mikið langt sum at siga, at Finnland beinanvegin góðtekur alt, sum ES sigur um Áland. Hetta skal vera, fyri at fáa ES at síggja meira millum fingrarnar við viðurskiftum, ið fara fram í Finnlandi annars.

Fyri kortum fekk Áland tó betur rætt at geva sína hugsan til kennar í ES-dómstólinum, men mong meta hetta bert vera eina estetiska broyting.

Í sambandi við sjálvt lóggávuverkið, viðurkenna álendingar uttan himpr, at møguleikin at ávirka er sera avmarkaður. Serliga er tað manglandi parlamentslimurin, sum álendingar meta vera eina orsøk. Tó eru teir partvíst umboðaðir í Evropatinginum við einum embætisfólki hjá finnlandssvenskarunum, sum hava eitt umboð í Evropatinginum – m.a. takkað verið, at álendingar í stóran mun velja hendan flokkin.

Umframt hetta politiskt setta umboðið, so er eitt embætisfólk undir ES eisini í Brússel, sum umboðar Áland og samskiftir við álendskar myndugleikar.

Harafturat hevur Áland ein tinglim í Finnlandi og umboð í fleiri av nevndunum í Finnlandi, sum taka sær av ES-limaskapinum.

Hóast ávirkanin úr Álandi á ES er avmarkað, so eru sjónlig álendsk fingramerki á ávísari lóggávu, sum álendingar hava valt at raðfesta og sum teir av ES hava verið mettir at hava holla vitan um. Eitt dømi er maritima lóggávan í Eystursjónum.

Nýggjasta kanningin av, hvat álendingar sum heild halda um ES er frá 2000. Talan er um ein stóra finska kanning, har einans 67 álendingar vórðu spurdir. Kanningin vísti tó, at sum heild vóru álendingar meira kritiskir mótvegis ES enn finnar. Álendingar luttaka eisini í minni mun til valini til Evropatingið enn fólkini á meginlandinum

gera. Í dag er ongin politiskur flokkur í Álandi ímóti ES-limaskapinum, og tey flestu meta tað bæði óhugsandi og juridiskt ógjørligt at melda seg úr felagsskapinum.

## Álendski samleikin

Verjan av álendska samleikanum er sum áður nevnt feld niður í fólkarættin. Men hetta merkir tó ikki á nakran hátt, at tað at vera álendingur er ein statisk støða. Seinastu 20 árini eru álendingar mestsum givnir at taka hægri útbúgvingar í Finnlandi, meðan alsamt fleiri eru farin til Svøríkis at lesa. Fyrr vóru tað eini 80 prosent, sum lósu í Finnlandi, meðan næstan 20 prosent lósu í Svøríki – nú er tað beint øvut.

Um hetta er ein avleiðing ella ein orsøk av ES-limaskapinum kann diskuterast, men tað er púra greitt, at sambandið hjá álendingum við Finnland gerst alsamt minni, meðan sambandið við Svøríki og restina av heiminum gerst alsamt størri.

Hinvegin eru álendingar eisini á einum máli um, at gjørdist Áland partur av Svøríki fyri 90 árum síðan, sum álendingar tá ynsktu, so hevði Áland helst bara verið ein natúrligur partur av Svøríki heldur enn eitt øki við sereyðkennum. Samleikin hevði verið veikari.

Samstundis sum møguleikarnir og sambondini út um Finnland eru økt, so er eisini greitt, at ein fólkavøkstur er farin fram í landinum. Fólkatalið vaks úr 26.008 fólkum í 2001 til 28.355 fólk í 2011. Við øðrum orðum er fólkatalið vaksið við 2.347 fólkum upp á 10 ár – ella við smáum 10 prosentum.

Burðaravlopið er rættiliga avmarkað, og tí er tað serliga tilflyting, sum er orsøkin til fólkavøksturin. Tað er serliga miðstaðarøkið uttanfyri høvuðsstaðin, sum upplivir hendan fólkavøkstur. Tað er eisini greitt, at meðan talið av fólkum, sum eru fødd í Álandi hevur verið støðugt hesi 10 árini, so eru tað tilflytarar úr øðrum londum – serliga úr londum uttanfyri Norðanlond – sum eru orsøkin til fólkavøksturin.

Diskussiónin um innflytarar í Álandi er ikki serliga umfatandi og lítið er kannað um, hvussu mongdin av útlendingum ávirkar álendingar, tí hetta hevur leingi verið ein veruleiki. Umleið triðingurin av íbúgvunum í Álandi eru ikki føddir á oyggjunum. Sum heild kann tó sigast, at álendingar ikki eru negativir um tilflytingina. Tankar eru tó frammi um, at tað er ein fyrimunur at tað ikki longur eru so nógvir Finnlendingar, sum flyta til Álands, tí hesi hava í ein ávísan mun arbeitt fyri at fáa eitt meira “finskt” samfelag.

# 4. PARTUR
# Ísland á einum vegamóti

## Íslendska kósin fær stóran týdning fyri Føroyar

**Ongantíð hevur ES fingið eina so hálvhjartaða umsókn um limaskap, sum tá kreppurakta Ísland søkti í 2010. Greiður meiriluti er nú ímóti limaskapi, men politiska orðaskiftið er merkt av ráðaloysi og ósemju um grundleggjandi spurningarnar. Tí kann hugsast, at limaskapur, tá til stykkis kemur, verður frægasta boðið. Verður Ísland limur, fær tað avleiðingar fyri Føroyar**

Íslendska stjórnin fór tann 27. juli í 2010 formliga undir samráðingar um fullan íslendskan limaskap í ES.

Hetta er tað seinasta av fleiri stigum, sum Ísland hevur tikið móti meiri umfatandi og meiri bindandi altjóða samstarvi síðani loysingina frá Danmark í 1944.

Tað fyrsta var, tá landið í 1949 gjørdist limur í NATO.

Ísland gjørdist síðani limur í GATT-samstarvinum í 1968, EFTA-limur í 1970, undirritaði EBS-sáttmálan í 1994, og gjørdist WTO-limur í 1995.

Hvørja ferð Ísland hevur bundið seg til meiri altjóða samstarv, hevur tað havt við sær politiskt split og stríð.

Serliga EBS-sáttmálin, sum gjørdi Ísland til part av innara marknaðinum í ES, elvdi til polarisering í politisku skipanini. Annar parturin helt hetta vera neyðugt til tess at menna íslendska búskapin, meðan hin parturin helt, at Íslandi fór at missa ein ov stóran part av sínum sjálvræði og sínum samleika.

Politisku treytirnar fyri EBS-limaskapinum vóru eisini harðar: 30.000 síður av ES-lógum og reglum skuldu setast í verk beinanvegin, og Ísland bant seg til støðugt at tillaga sína lóggávu til hana í ES. Tað hevur havt við sær, at umleið 70% av ES-lóggávuni eisini verður sett í verk í Íslandi.

Innanríkis ósemja eyðkennir eisini tilgongdina móti fullum ES-limaskapi, sum Ísland nú er farið undir.

Samráðingarnar hava tikið longri tíð enn væntað - m.a. orsaka av íslendskum stríði. Samráðingarnar eru býttar sundur í 33 partar, og tá hetta verður skrivað, er eingin loysn funnin á teimum truplu pørtunum.

Tí verður ikki liðugt at samráðast fyrr enn eftir næsta altingsval, og hugsandi er, at tann stjórn, sum tá kemur framat, ikki hevur ES-limaskap sum mál. Tað er enntá møguleiki fyri, at komandi stjórnin fer at steðga samráðingunum.

Tað er bara íslendski Javnaðarflokkurin, Samfylkingin, ið sum flokkur tekur fult undir við ES-limaskapinum. Hinir stóru flokkarnir – Sjálfstæðisflokkurinn, Vinstrihreyfingin og Framsóknarflokkurinn – eru ímóti ES-limaskapi. Men fleiri einstaklingar í hesum flokkum fylgja kortini ikki flokskósini, og siga seg vera fyri ES-limaskapi.



*Áðrenn farið varð undir samráðingar gjørdi Øssur Skarpheðinsson, uttanríkisráðharri, ES greitt, at Ísland má hava undantøk tá tað snýr seg um fiskivinnu*

# Almennu grundgevingarnar

Almennu grundgevingar Íslands fyri at søkja um limaskap síggjast í teirri talu, sum Øssur Skarpeðinsson, uttanríkisráðharri, helt í Brússel, tá íslendska umsóknin formliga varð latin ES-kommissiónini.

**Grundgevingar vóru í høvuðsheitum hesar:**

- Limaskapur er eitt náttúrligt framhald av teirri uttanríkispolitisku kós, sum Ísland hevur havt, har landið er vorðið limur í støðugt fleiri evropeiskum felagsskapum.
- Ísland varðveitir best sítt sjálvræði og røkir best síni áhugamál við at hava egna rødd tí skipaða samstarvinum millum vesturlendsk fólkaræði.
- Íslendski samleikin er ein evropeiskur samleiki og íslendska mentanin er ein evropeisk mentan. T.d. geva íslendsku saga'irnar bæði innlit í evropeiska og íslendska søgu.

- Ísland er gjøgnum EFTA og EBS ein so samrunnin partur av Evropa sum tað ber til at vera uttan ES-limaskap. Nú vil Ísland sita við "familjuborðið", har avgerðirnar vera tiknar.
- Ísland vil hava eitt sterkt, altjóða gjaldoyra.
- Ísland vil hava útlendskar íløgur.
- Íslendska stjórnin vil í teirri sterku, evropeisku familjuni finna tryggleika til Íslendsku tjóðina, sum hvørki hevur ella vil hava hermegi.

Ráðharrin segði, at tað var tá samstarvið við Evropa innan handil, politikk, list, útbúgving og mentan hevði nátt nýggjum hæddum, at íslendska samfelagið hevði blómað. Tað sama helt hann fór at henda við ES-limaskapinum. Samstundis fór Evropeiska Samveldið við íslendskum limaskapi at gerast sterkari og at endurspegla eina meiri fullfíggjaða mynd av tí fjølbroytni, sum er í Evropa.

Íslendska umsóknin er óvanlig, tí talan var ikki um eina umsókn um limaskap. Tað, Ísland søkti um, vóru samráðingar. Altingið vildi síggja, hvat ES hevði at bjóða.

Íslendski ráðharrin førdi í umrøddu talu eisini fram nøkur sjónarmið, ið illa kunnu lesast sum annað enn greiðar treytir, sum ES má lúka, um Ísland skal gerast limur.

Hann vísti á serlig viðurskifti, sum gera seg galdandi viðvíkjandi íslendskari fiskivinnu (meiri um hetta seinni) og skeyt upp, at íslendskir myndugleikar varðveita ræðið á fiskivinnuni á heimaleiðum.

Viðvíkjandi landbúnaðinum greiddi hann frá, at talan er um eitt serligt, geografiskt treytað slag av landbúnaði, har bert ein bóndi og hansara familja eru á hvørjum garði. Eisini hetta helt hann, at atlit eiga at verða tikin til.

Tá tað eisini verður havt í huga, at altingsmeirilutin fyri at søkja um samráðingarnar var sera lítil, og at annar stjórnarflokkurin – *Vinstrihreyfingin - grænt framboð* – bert atkvøddi fyri tí tað var eitt krav frá Samfylkingini, so má sigast, at íslendska tilgongdin ikki bara er varlig, men rættiliga hálvhjartað.

# Argument fyri og ímóti

Í stuttum kann sigast, at Evran er størsta orsøk fyri at fara uppí ES, meðan verandi fiskivinnupolitikkur í ES er størsta orsøk ímóti. Men fleiri onnur viðurskifti gera seg galdandi.

Á einum av mongu fundunum, sum Javnaðarflokkurin á Fólkatingi hevði á íslandsvitjanini í fjør, hoyrdu vit eina søgu um ein ungan mann ið, tá íslendski búskapurin

fall saman sum eitt korthús í 2008, ringdi til mammu sína og gramdi seg um, at øll hansara samansparing nú var horvin. Men mamman var púra rólig. “Tað manst tú fara at yvirliva”, svaraði hon. “Hatta sama er hent mær - tríggjar ferðir!”

Hetta at virði kunnu hvørva frá degi til dags, er stóri vansin við at at hava egið, lítið og veikt gjaldoyra. Og tað er eingin ivi um, at tá Samfylkingin vann seinasta Altingsval við ES-limaskapi sum einum av høvuðsmálunum, so vóru útlitini til, at Ísland við ES-limaskapinum kundi fáa eitt nýtt og stabilt gjaldoyra eitt agn, sum fiskaði nógvar nýggjar atkvøður.

Hóast undantøk eru, halda flestu íslendingar tað vera ein trupulleika - bæði fyri privatu húsarhaldini, vinnulívið og landsbúskapin - at Ísland hevur egið gjaldoyra

At hava egið gjaldoyra merkir at hava eitt veikt og viðbrekið gjaldoyra. Og eitt viðbreki gjaldoyra skapar sera stóran ótryggleika. Aftur og aftur hava sveiggini í íslendska búskapinum havt við sær so ógvusligar niðurskrivingar av krónuni, at fólk í roynd og veru hava mist síni virði. Og aldrin hevur tað verið so ógvusligt sum síðani oktober 2008.

Eisini verður tikið fram, at verandi gjaldoyra styrkir fíggjarligu sveiggini, meðan eitt stabilt gjaldoyra hevði virkað útjavnandi og stabiliserandi.

## Fortreyt fyri útlendskum íløgum

Ein annar vansi við krónuni er, at fyritøkur, sum ætla sær inn í Ísland, bæði mugu taka á seg stóran váða, og seta seg inn í serligar treytir.

Forsprákarar fyri ES-limaskapi halda, at skal Ísland gerast dragandi hjá útlendskum fyritøkum, sum kunnu gera íløgur og byggja upp nýggjan, vitanartungan ídnað, so krevur tað bæði eitt stabilt gjaldoyra, og at lóggávan er kend og púra harmoniserað við ES.

Um landið - við ES-limaskapi - ikki verður “latið upp”, verður endin, at Ísland bara livir av orkuframleiðslu, fiskivinnu og ferðafólkavinnu, og hevur lítlan annan ídnað, ið kann gera landið áhugavert hjá yngri og væl útbúnum fólki.

Sum er halda útlendskar fyritøkur seg ofta burtur, og avleiðingin er, at Ísland hevur monopol ella duopol á fleiri økjum. Tað gagnar nøkrum fáum, men ikki vanliga løntakaranum, verður sagt .

At loysa frá Danmark snúði seg í stóran mun um at fáa frían handil. Limaskapur í ES snýr seg eisini um at gera handilin fríari.

# Gjaldoyra-eftirlit

Í løtuni hevur eingin álit á íslendsku krónuni. Fólk og fyritøkur vilja flyta sín pening úr Íslandi ella keypa sær annað, sterkari gjaldoyra fyri sínar íslendsku krónur. Men sleppa tey tað, verður mett, at í minsta lagi tað, sum svarar til 50 milliardir danskar krónur, verða sognar út úr landinum. Hetta er lutvíst peningur, sum 1000-tals útlendingar eiga, og lutvíst partabrøv í bankum.

Umframt hetta er sannlíkt, at íslendingar sjálvir høvdu keypt útlendsk gjaldoyra fyri sínar pengar, um teir sluppu tað.

Um marknaðurin var fríur hevði tað sostatt máað støðið undan búskapinum - og tí er sonevnt "gjaldoyra eftirlit" sett í verk.

Ítøkiliga merkir tað, at eingin hevur loyvi til at flyta valuta av landinum. Ein íslendingur kann í mesta lagi keypa útlendskt gjaldoyra fyri umleið 15-20.000 danskar krónur, og útlendski handilin hjá fyritøkum er undir almennum eftirliti.

Hetta er ikki eitt nýtt fyribrigdi í Íslandi - tað hevur áður verið galdandi í mong ár. Men nú hevur Ísland bundið seg til ásetingarnar í EBS-samstavinum. Og ein tann týdningarmesta er, at kapitalur skal hava frítt at fara millum londini í innara marknaðinum í ES.

Eftirlitið verður góðtikið sum er - men tað er tí at støðan í Íslandi er so ekstrem í løtuni. Tað verður ikki góðtikið í fleiri ár.

Tað er eisini trupult at halda forboðnum uppi. Fólk finna mátar at sleppa uttanum. Til dømis kunnu útflytarar selja til egnar fyritøkur uttanlands fyri undirprís og á tann hátt í veruleikanum veksla íslendskt gjaldoyra til útlendskt.

Tey flestu ásanna, at íslendska krónan er ein trupulleiki fyri Ísland - eisini tey, sum eru ímóti ES-limaskapi. Tí hava politikarar, sum eru ímóti limaskapinum, skotið upp, at Ísland kann fáa sær eitt triðja gjaldoyra. Amerikanski og canadiski dollarin og norska krónan eru nevnd. Hetta kann antin gerast við samráðingum við viðkomandi land - ella kann Ísland við einvegis avgerð taka annað gjaldoyra eins og t.d. Ecuador og Zimbabwe hava gjørt við amerikanska dollaran.

Fleiri fakfólk mæla kortini staðiliga frá at fara hesa leið, tí tey halda tað fara at skapa uppaftur størri ótryggleika.

Nøkur eru kortini, sum halda, at Ísland skal varðveita sína egnu krónu. Eitt argument er, at við egnari krónu varðveita íslendingar møguleikan fyri devaluering sum búskaparpolitiskt stýringsamboð. Hildið verður, at tað síðani 2008 hevur verið ein fyrimunur at kunna niðurskrivað krónuna.

Eisini verður víst á, at hóast Ísland verður limur, so ganga fleiri ár inntil landið lýkur treytirnar fyri at kunna taka evruna sum gjaldoyra.

## Fiskivinnan

Longu tá Ísland lat inn sína umsókn um limaskap var tað sett upp sum ein treyt, at landið fær eina seravtalu, sum í minsta lagi tryggjar Íslandi fult ræði á egnum fiskastovnum.

Tað eru bert heilt fá, ið vilja hava limaskapin, um tað ikki eydnast at fáa eina avtalu um hetta.

Tað er ilt at meta um, hvørji útlitini eru fyri, at Ísland fær hesa seravtalu. Men tað er eingin ivi um, at Ísland hevur góð argument fyri sínum krøvum:

1) Ísland er meira heft at fiskivinnu enn nakað annað ES land.

2) Ísland fiskar einsamalt 25% av tí sum ES fiskar tilsamans.

3) Nærum helvtin av íslendska útflutninginum stavar frá fiskivinnuni.

4) Inntøkan av fiskivinnuni fyri hvønn íbúgva er 100 fer so stór í Íslandi sum í ES.

5) Íslendska havøkið er stórt - 760.000 ferkilometrar - og hevur ikki mark til onnur ES lond.

6) Fiskivinnupolitikkurin í ES hevur verið alt annað enn væleydnaður, meðan tað hevur eydnast Íslandi at rationalisera vinnuna og tryggja burðardygga veiðu (Ísland fiskar 1,4 mió. tons við 500 skipum, meðan Spania fiskar 700.000 tons við 11.000 skipum).

7) Fleiri ES-lond og øki í ES *hava* longu serskipanir sum er - t.d. Malta og Kanarisku oyggjarnar.

8) ES endurskoðar í løtuni sín egna fiskivinnupolitikk. Tað fer væntandi at hava við sær, at londini sjálv sleppa at umsita ávísar lokalar fiskastovnar.

Men tað sum ger tað mest sannlíkt, at Ísland fær eina rímiliga avtalu er tann veruleiki, at ES fór undir samráðingar um íslendskan limaskap undir teimum treytum, sum Ísland frá byrjan setti upp. ES-Kommissiónin veit fullvæl, at ein góð avtala um fiskivinnuna er ein fortreyt, um Ísland skal gerast limur. Kommissiónin veit, at uttan eina slíka avtalu, er orkan, sum brúkt verður til samráðingarnar, burturspilt. So tað, at ES samráðist, bendir í sær sjálvum á, at ES er sinnað at slaka.



*Nakrir av íslendsku embætismonnunum, sum arbeiða við samráðingunum um ES-limaskapin*

Júst *hvørja* avtalu Ísland fær er sjálvandi ógjørligt at meta um. Men sannlíkt er helst, at Ísland sum ES-limur kann varðveita ræði á sínum egnu, lokalu botnfiskastovnum. Hinvegin er ósannlíkt, at nøkur serskipan fæst fyri pelagisk fiskasløg. Her fer ES at krevja eina fasta avtalu, sum tryggjar stabilitet yvir tíð - og ikki hevur stóran elastisitet tá tað snýr seg um atlit til, hvussu stovnarnar ferðast ár um ár. Tí ræður um hjá Íslandi - eins og hjá Føroyum - at standa fast við kravið um ein rímiligan part av makrelkvotuni.

Tað er eisini ósannlíkt, at Ísland sum ES-limur fer at sleppa at halda útlendingum burturi frá egnari fiskivinnu, soleiðis sum gjørt verður í dag. Helst fer at bera til at leggja treytir við (í Danmark er tað t.d. ein treyt, at ein persónur skal hava búð har í 3-5 ár áðrenn hann kann gera íløgur í donsku fiskivinnuna), men grundreglan má helst vera, at marknaðurin skal vera opin. Í dag er hann púra stongdur.

## Landbúnaðurin

Eisini tá tað snýr seg um landbúnað er lítið hugsandi, at tann protektionisma, sum Ísland hevur í dag, kann halda fram.

Okkurt slag av stuðli kann helst latast, og ávísar avmarkingar kunnu helst setast - ES góðtekur t.d. at bæði Finnland og Svøríki hava serskipanir fyri framleiðsluna har norðuri í londunum. Men eisini her má grundreglan helst vera, at marknaðurin verður latin upp.

## Hvalaveiða

Hvalaveiða hevur lítlan fíggjarligan týdning fyri Ísland - men fyri nógv hevur rætturin at drepa stórhval søguligan og tjóðskaparligan týdning.

Tá uppleggið til samráðingar um limaskap var orðað og viðtikið, legði Altingið dent á, at serligur dentur skuldi leggjast á møguleikar Íslands fyri at halda fram við hvalaveiðuni. Hetta er tí eitt greitt mál við samráðingunum - og tað gjørdi Øssur Skarpheðinsson, uttanríkisráðharri, eisini greitt tann 27. juli 2010.

Men hetta hevur eisini stóran týdning fyri nógv ES-lond, sum hava eina aðra hugsan enn Ísland. Tí er helst ivasamt, um ES fer at víkja frá sínum grundreglum á hesum øki og geva Íslandi undantak.

## ES-limaskapur - demokratiskur ella ódemokratiskur?

Báðir partar í íslendska kjakinum grundgeva fyri síni støðu við at siga, at teir vilja verja landsins fólkaræði.

Mótstøðuflokkarnir halda tað gera íslendska fólkaræðið veikari, um íslendingar skulu geva seg undir viljan hjá 500 milliónum ES-íbúgvum, og um vald verður latið útlendskum stovnum, sum eru langt burturi, og sum ikki hava servitan um íslendsk viðurskifti.

Í orðaskiftinum verður eisini víst til tað stríð, sum Ísland hevur havt fyri at vinna fram til sína støðu sum eitt frælst, óheft land. Loysingin frá Danmark og toskakríggið móti Bretlandi verða ofta tikin fram. ES-limaskapur er at fara hinvegin, og gera landið heft og ófrælst. Ísland fer t.d. ikki frítt at kunna gera avtalur við onnur lond.

Tað er eisini stórur ótti fyri, at ES so ella so fer at taka náttúruríkidømið frá íslendsku tjóðini, og soleiðis gera hana veikari og minka um hennara møguleikar fyri at reisa seg aftur og klára seg sjálva.

Hóast tað skuldi eydnast at fingið nøktandi avtalur fyri fiskivinnuna, landbúnaðin og orkuframleiðsluna, so eru mótstøðuflokkarnir ímóti limaskapi - m.a. tí teir ikki



*Ragnheiður Elín Árnadóttir, forkvinna í tingbólki Sjálfstæðisfloksins og Guðlaugur Þórður Þórðarson, tingmaður og fyrrverandi ráðharri tosa við Javnaðarflokkin á fólkatingi. Sjálfstæðisflokkurin er hart ímóti íslendskum ES-limaskapi*

halda nakra trygd verða fyri, at hesar avtalur fara at standa við. Tá Ísland er innanfyri kunnu viðurskifti, sum víkja at Íslandi, broytast av meirilutanum í ES - ímóti vilja Íslands. Sum sagt verður: Tey einastu, sum altíð vilja verja íslendsk áhugamál, eru íslendingar.

Mótstøðuflokkarnir ásanna, at Ísland, orsakað av EBS limaskapinum, má seta ES-lóggávu í verk uttan at hava ávirkan á hana. Men teir halda hetta vera eitt argument, sum verður blást upp til at hava 100 ferðir størri týdning, enn tað í veruleikanum hevur. Sannleikin er, siga mótstøðuflokkarnir, at limaskapur næstan einki broytir í so máta, tí Ísland fær næstan onga ávirkan í ES kortini. Tað eru tey stóru, sum har ráða.

Ytsti vinstrivongurin, *Vinstrihreyfingin – grænt framboð* (Vinstri Grøni), er harumframt hugsjónarliga ímóti ES, tí tey halda talan vera um eitt samveldi, ið verður stýrt sambært liberalistiskum - og ikki sosialistiskum og demokratiskum - grundreglum.

Samfylkingin hevur eina heilt aðra áskoðan.

Sosialdemokratiskir flokkar plaga at siga, at frælsi marknaðurin er góður tænari, men ringur harri. Í samsvari við hesa grundhugsan tekur Samfylkingin hugsjónarliga undir við frælsa marknaðinum, men ásannar, at hann ikki kann standa einsamallur: Tørvur er á eini sterkari, demokratiskari, politiskari skipan, sum kann loysa teir trupulleikar, sum hesin marknaður skapar.

Og í einum globaliseraðum heimi er henda skipan ikki nóg sterk, so leingi hon bara er íslendsk.

Ísland er gjøgnum EBS-sáttmálan partur av marknaðinum í ES við 500 milliónum íbúgvum. Men gongdin farnu árini sýnir sambært Samfylkingini púra greitt, at tað ikki er heppið bert at vera partur av marknaðinum - tað er eisini tørvur á at verða partur av teirri politisku skipan, sum er karmur um henda marknað.

Tá marknaðurin er nógv størri enn politiska skipanin, kann eitt lítið samfelag, við veikum politiskum stovnum, skjótt enda sum offur hjá stórum fyritøkum. Og Ísland fekk eftir aldarskiftið fyritøkur, sum vuksu seg risastórar á ES-marknaðinum - onkur hevði 200.000 fólki starvi. Íslendska politiska skipanin megnaði als ikki stýra teimum. At Ísland ikki hevði nóg sterk politisk amboð var sambært Samfylkingini ein av orsøkunum til skrædlið í oktober 2008: Marknaðurin ráddi einsamallur, politiska valdið - demokratiið - formáddi sær einki.

At geva frá sær vald til ES-stovnarnar er tí, óbeinleiðis, at styrkja politisku skipanina í Íslandi og at styrkja fólkaræði mótvegis marknaðinum.

Harumframt vísir Samfylkingin á, at Ísland, orsakað av EBS-avtaluni, hevur bundið seg til at seta í verk umleið 70% av ES-lóggávuni. Men Ísland hevur einki umboð har, sum henda lóggáva verður smíðað. Onkur hevur sarkastiskt kallað hetta "telefax-demokrati", tí Ísland bara tekur ímóti lidnari lóggávu og setur hana í verk.

Flokkurin ásannar, at Ísland ikki hevði fingið avgerandi ávirkan á ES í øllum økjum. Limaskapur hevði givið landinum ein kommisser og 6 parlamentslimir. Men tað er vanligt, at lurtað verður eftir teimum, sum hava servitan á einum øki, og tí heldur Samfylkingin, at Ísland kundi fingið ávirkan innan eitt nú fiskivinnu og orkuframleiðslu.

Sum heild metir flokkurin, at íslendskur limaskapur hevði verið eitt framstig fyri fólkaræðið.



*Leiðandi umboð fyri íslendska Framsóknarflokkin eftir fund við Javnaðarflokkin á Fólkatingi. Sum flokkur er Framsóknarflokkurin ímóti ES-limaskapi, men nøkur av umboðunum eru fyri. Frá vinstru: Sigurður Ingi Jóhannsson, Siv Friðleifsdóttir, Sigmudur David Gunnlaugsson og Vigdís Hauksdóttir. Frammanfyr standa: Joan Ólavsdóttir, Elisabeth F. Rasmussen, Birita í Dali og Eirikur í Jákupsstovu.*

# Hvørji áhugamál hevur ES?

Politikarar í mótstøðuflokkunum halda, at ES hevur nógv meira at vinna við Íslendskum limaskapi enn Ísland. Illgrunin er, at ES vil hava Ísland sum lim fyri at fáa atgongd til Íslendska náttúruríkidømið, og fáa fótin geografiskt fastan í Arktis.

Hetta er ilt at meta um - men bara tað at ES er farið undir samráðingarnar og nýtir orku til tær, hóast mótstøðan í Íslandi er so stór, íslendsku treytirnar so harðar og úrslitið av eini fólkaatkvøðu so ivasamt bendir á, at tað er sterkur vilji í ES skipanini at fáa Ísland sum lim.

Harumframt er hugsandi, at ES hevur eyguni vend móti Noregi. Tað er eingin ivi um, at ES heldur enn fegið vil hava ríkasta landið í Evropa sum lim - og íslendskur limaskapur verður uttan iva eitt gott kort í hondunum á teimum, sum eina triðju ferð vilja royna at yvirtala norska fólkið at siga ja til limaskap.

# Útlitini

Hóast meirilutin í Altinginum hevur verið ímóti, var heilt inntil 2010 í mong ár meiriluti millum íslendingar fyri at fara uppí ES. Støðan var sostatt tann øvuta av teirri vit kenna úr t.d. Noregi, har fólkið er ímóti, meðan politiska skipanin er fyri.

Men nú samráðingarnar eru byrjaðar, er hugsanin millum fólk broytt. Einans umleið 25% taka undir við limaskapinum.

Orsøkin er uttan iva fyrst og fremst kreppan í syðra parti av ES og tann avleidda óvissan um hvat hendir við Evruni og við ES sum heild. Í løtuni er lætt hjá mótstøðuflokkunum at siga, at ES ikki er tað rætta fyri tann, sum leitar eftir stabiliteti og tryggleika...

Meiningarkanningarnar skulu kortini takast við fyrivarni. Eingin veit framvegis um samráðingarnar verða førdar á mál ella hvussu ein møgulig avtala millum ES og Ísland fer at síggja út. Eydnast Íslandi at fáa eina nøktandi skipan fyri fiskivinnuna, kann nógv broytast.

Tað valdar eisini stór óvissa um íslendsku krónuna og gjaldoyra-eftirlitið. Hvussu leingi fara onnur lond at góðtaka, at EBS-landið Ísland ikki loyvir kapitali at ferðast frítt? Og hvussu realistisk eru tey alternativ til evruna, sum teir flokkarnir, ið eru ímóti ES-limaskapi, tosa um?

Hvussu leingi fer óvissan um evruna og óvissan um búskapin í serliga syðra parti av Evropa og Írlandi at varða við? ES veit, at ótryggleikin ræðir íslendingar. Fer ES møguliga at bjóða Íslandi at "frysta" samráðingarnar inntil støðan er meira trygg?

Hesir og nógvir aðrir avgerandi spurningar eru framvegis ikki svaraðir.

Tað mest avgerandi er helst hvussu Altingið verður mannað á valinum, sum í seinasta lagið verður í apríl 2013, og hvør stjórn, ið síðani verður skipað.

Endar Samfylkingin í andstøðu, er sannlíkt, at sterkar kreftir vilja hava málið um íslendskan ES-limaskap tikið av dagsskránni. Men um íslendska stjórnin einsíðugt steðgar samráðingunum, sum hon sjálv hevur biðið um, fer tað at skaða landsins trúvirði. Tí vilja flestu flokkar hava eitt samráðingarúrslit, áðrenn samráðingarnar steðga. Men tað kann eisini henda, at fólkaatkvøða verður um, hvørt samráðingarnar skulu halda fram ella ikki - hóast einki samráðingarúrslit fyriliggur.

Tá hugt verður at hvat flokkarnir og meiningarkanningarnar siga, er greitt, at íslendskur ES-limaskapur er lítið sannlíkur í løtuni.

Men tá hugt verður at tí ráðaloysi og teirri ósemju, sum er um teir grundleggjandi

spurningarnar, so er ikki heilt óhugsandi, at limaskapur, tá til stykkis kemur, fer at verða mettur sum tað frægasta boðið.

## Týdningur fyri Føroyar

Um Ísland verður ES-limur, verða Føroyar geografiskt umgyrdar av tveimum ES-londum (Bretlandi og Íslandi) og einum EBS-landi (Noreg).

Tað í sær sjálvum kann hugsast at leggja trýst á føroysku myndugleikarnar, eins og tað kann fáa ávirkan á almennu meiningina í Føroyum.

Okkara samband við Ísland verður beinleiðis ávirkað á tann hátt, at bæði okkara fiskivinnuavtalur og okkara handilsavtalur við grannan fyri vestan sum útgangsstøði detta burtur.

Hyggja vit at stríðnum, sum farnu árini hevur verið um rættin at fiska av ferðandi, pelagiskum fiskastovnum, er hugsandi, at Íslendskur limaskapur í ES fer at gera, at Føroyar standa meira einsamallar enn higartil: Ísland, sum stundum hevur nýtt somu argument sum Føroyar og harvið givið teimum størri tyngd, verður tá okkara mótpartur.

Ísland fer í samráðingunum at leggja dent á tøttu viðurskiftini við Føroyar, og hevur sum mál, at londini sleppa at menna sítt serliga samstarv eisini eftir at Ísland er vorðið ES-limur.

Hvussu úrslitið verður, ber illa til at meta um, men sambært ES-reglum má Ísland antin siga upp sínar handilsavtalur, ella broyta tær, so tær verða í samsvari við tær avtalur, sum ES hevur. Hoyvíkssáttmálin er í løtuni ikki í samsvari við felags handilspolitikkin í ES.

Hvussu verður við fiskivinnuavtalunum millum Føroyar og Ísland veldst um, hvørja avtalu Ísland fær við ES um ræði á egnum fiskastovnum.

# 5. PARTUR

# Grønlendsku royndirnar

## Grønland við Danmark í EF

**Hóast støða Føroya og Grønlands mótvegis Danmark er sera lík, eru okkara viðurskifti við ES rættiliga ólík - bæði søguliga og í dag. Vit kunnu læra av grønlendingum - bæði tá tað snýr seg um tað, teir hava gjørt skeivt, og tað, teir hava gjørt rætt.**

Grønland bleiv partur av danska limaskapinum í EF í 1972, og í hesum partinum fara vit at hyggja nærri at, hvussu hetta fór fram.

Kjakast hevði verið um danska limaskapin í eina tíð, og í 1969 bleiv eitt uppskot samtykt í Fólkatinginum um, at Danmark skuldi samráðast um upptøku í EF. Teir báðir grønlendsku fólkatingslimirnir stuðlaðu hesum uppskotinum, tí teir fingu at vita, at atlit fóru at verða tikin til serstøku grønlendsku viðurskiftini í samráðingunum - serliga grønlendsku fiskivinnuna.

Ein nýggj politisk rørsla tók seg upp í Grønlandi hesa tíðina, ið var atfinningarsom ímóti grønlendskum limaskapi í EF. Hendan rørslan var mest av øllum hugsjónarlig.

Í Grønlandi varð spurningur settur við ta alráðandi donsku ávirkanina, og tað kendist at fara skeivan veg, at fara at flyta ta donsku stýringina enn longur burtur - *til eina EF stýring*.

Danskir myndugleikar høvdu undir samráðingunum um danska limaskapin fingið eina protokoll um Grønland, ið gav grønlendskum fiskiskapi einkarætt innan 12 fjórðingar. Men hendan skipanin var bert galdandi í 10 ár, og tí var einki tekin um, at EF vildi tryggja, at útlendsk fiskifør ikki fingu atgongd til grønlendska strandaveiðu.

Fólkaatkvøðan um danskan EF-limaskap var á vári 1972. Føroyar høvdu fingið heimastýrið í 1948, men stjórnarrættarliga støða Grønlands hevði síðan 1954 mest verið at sammeta við eitt amt í danska kongsríkinum. Hetta var orsøkin til, at

grønlendingar - og ikki føroyingar – skuldu til EF-fólkaatkvøðu saman við restini av donsku veljarunum í 1972, tá atkvøtt var um EF limaskapin hjá Danmark.

Teir ungu grønlendsku politikararnir royndu at skilja fólkaatkvøðuna í Grønlandi frá donsku atkvøðuni. Í landsráðnum var meiriluti fyri at gera mun á grønlendsku og donsku atkvøðuni, og Moses Olsen, táverandi fólkatingslimur, tók málið upp í danska Fólkatinginum. Men tað var ov seint. Skuldu atkvøðurnar haldast hvør sær, var neyðugt at samráðast av nýggjum við EF, eins og broytingar í vallógini vóru neyðugar. Hetta var danska stjórnin ikki sinnað til. Eisini var ivi um, hvørt Grønland - við sínum tætta tilknýti til Danmark - kundi vera uttanfyri EF.

Í Grønland vóru tó eisini EF viðhaldsfólk, ið høvdu somu hugsan sum donsku EF-viðhaldsfólkini. Hesi hildu, at eitt nei til limaskap fór at hava við sær stórar búskaparligar avleiðingar fyri Danmark og tískil gera umstøðurnar verri hjá Danmark at stuðla menningini í Grønlandi. Harafturat bleiv víst á, at tollfría atgongdin til tann stóra EF-marknaðin var ein góður møguleiki hjá grønlendska fiskaútflutninginum.

Valdysturin var harður og kensluborin, og kjakið flutti seg frá at vera avmarkað til EF-limaskap til at snúgva seg um grønlendskt sjálvræði yvirhøvur. Eitt ja til EF bleiv av mongum tulkað sum ein góðkenning av meiri fjarstýring og at siga endaliga farvæl til grønlendskt sjálvstýri. Úrslitið av grønlendsku atkvøðuni var eitt týðiligt nei til EF. Valluttøkan var 55,7% - og ikki færri enn 71% av atkvøddu ímóti danska limaskapinum í EF. Grønlendsku atkvøðurnar blivu tó lagdar saman við donsku atkvøðunum, har meirilutin, ið taldi 63,4%, atkvøddi fyri donskum limaskapi. Grønland bleiv tí - ímóti sínum vilja - limur í EF ígjøgnum Danmark.

Bæði Danmark og Grønland ásannaðu, at í framtíðini mátti forðast fyri, at hetta endurtók seg. Tí bleiv ein nevnd sett at kanna møguleikarnar fyri grønlendskum heimastýri.

## Royndirnar við fiskiskapinum innan EF

At Grønland fór við Danmark í EF hevði við sær, at grønlendskur sjógvur nú var EF sjógvur. EF hevði umsitingina við grønlendska økinum og gjørdi av, hvør fiskaði hvat og hvussu nógv. Í 1977 kom ein tann størsta kollveltingin í søguni hjá grønlendska fiskiskapinum, tá 200 fjórðinga fiskimarkið varð sett í verk.

Fyri tjóðir sum Týskland, ið lítið og einki hevði at ráða yvir av sjógvi, og sum hevði bygt sín fiskiskap á stórar trolarar til fjarfiskiskap, var hetta ein vanlukka. Fyri lond sum Grønland, ið hava stórt hav og ein minni fiskiflota, var hetta ein stórur fyrimunur. EF hevði ætlað, at víðkanin skuldi umsitast av EF, og at havið, sum lá millum teir

áður ásettu 3 fjórðingarnar og teir nýggju 200 fjórðingarnar, skuldi vera EF hav. Grønland fekk tó eina týdningarmikla serskipan, ið gav grønlendska fiskiflotanum einkarætt at fiska innanfyri 12 fjórðingar.

Tað var ikki Grønland ella Danmark, men EF, ið umsat kvoturnar, og grønlendingar kendu seg sera ótryggar við miðsavnanina av umsitingini í Brússel. At skula ferðast til Brússel fyri at fáa kvotur til egnan sjógv fall ikki í góða jørð hjá grønlendingum, serliga ikki tá hugsað verður um, at grønlendingar ongantíð sjálvir høvdu valt at gerast limir í EF. Harafturat fóru søgur at ganga um týskar trolarar, sum rovfiskaðu í grønlendskum sjógvi eftir at danska fiskiveiðueftirlitið í 1980 hevði tikið tríggjar vesturtýskar trolarar fyri ólógligan fiskiskap við grønlendsku eysturstrondina. Teir høvdu fiskað meiri, enn teir høvdu loyvi til, og høvdu eisini latið umsitingini skeiv tøl.

Grønlendingar høvdu tí ta fatan, at fleiri trolarar fiskaðu ólógliga, og tøl vísa, at henda veiðan hevði eitt virði á umleið 200 milliónir um árið. Danmark var ikki ført fyri at hava eftirlit við øllum tí týska flotanum, ið fiskaði við Grønland, og Týskland segði seg ikki vera ført fyri at kanna trolararnar, tá teir komu í havn. Men so leingi Grønland var limur í EF, høvdu EF fiskiskip atgongd til grønlendskan sjógv.

EF mótstøðufólkini í Grønlandi vístu støðugt á hesi viðurskifti í sínum mótmælum ímóti grønlendskum limaskapi í EF. Vinnustýrið (*Erhvervsdirektoratet*) gjørdi eina uppgerð, sum vísti, at Grønland í 1980 fekk 107,2 mió. krónur frá ymsum stuðulsstovnum í EF, men virði av tí virkaða fiskinum, ið EF fekk ella seldi víðari til onnur lond var 584,54 milliónir krónur[18]. Mótstøðufólkini hildu ikki, at Grønland - sum geografiskt var størri enn øll hini londini í EF tilsamans - fekk nóg góðan ágóða av at vera við í EF.

So leingi Grønland var við í EF, so var tað EF - ikki Grønland - sum gjørdi av, hvør kundi fiska hvat í Grønlandi. T.d. spurdi EF ikki grønlendska heimastýrið um ráð, tá EF noktaði føroyingum at fiska í grønlendskum sjógvi. Grønlendskir politikarar vísa á, at tað kundi verið ein fyrimunur, um tað vóru føroyingar - og ikki týskarar - ið fiskaðu á grønlendskum leiðum[19]. Ein av teimum, sum virkaði fyri at fáa Grønland úr EF, Hans Jacob Helms, skrivaði soleiðis í 1981:

"*For et fiskeri-afhængigt land er EF medlemskab i dag en ulykke. Og for et fiskeri-afhængigt land, der er ved at opbygge sit eget styre og ønsker at tage hånd om sin egen udvikling, er EF-medlemskab ganske enkelt en katastrofe"*[20].

Grønlendingar ásannaðu skjótt, at tað var ein eyðsýndur fyrimunur at fara úr EF. Uttanfyri EF kundi Grønland fiska allan tann fiskin, sum flotin megnaði at fiska – og landið kundi sjálvt gera sína langtíðar menningarætlan. Grønland hevði eisini kunnað kravt av útlendskum fiskiførum, at tey skuldu landa ein týðandi part av veiðuni í




*Grønland misti stýringina við fiskiskapinum hjá EF-skipum í grønlendskum sjógvi*

grønlendskum havnum, ið kundi ment vinnuna á landi. Síðst - men ikki minst - kundi Grønland vart teir ymisku fiskastovnarnar, so teir kundu vaksið seg stórar aftur[21].

## Grønland meldar seg úr EF

Í 1970'unum vórðu politisku flokkarnir Siumut og Inuit Ataqatigiit settir á stovn – og teir vóru báðir móti EF limaskapi. Seinni varð Atassut, sum var fyri EF limaskapi, stovnaður. Eftir at heimastýrið varð sett í gildi í Grønlandi í 1979, var ein av teimum fyrstu málunum at fyrireika gongdina til at melda seg út úr EF, sum tað fyrsta landið nakrantíð. Fólkaatkvøðan um at melda seg úr EF bleiv sett at vera 23. februar 1982.

EF stuðlaði Atassut og flokkurin førdi fram, at Grønland fór at missa allan stuðul úr

EF, um landið tók seg úr. Í 1981 fóru EF mótstøðufólkini saman í felagsskapin, ANISA ("Latið okkum fara út!"), sum fevndi um flokkarnar, Siumut, Inuit Ataqatigiit, fakfelagið SIK og KNAPK, ið var felagið hjá fiski- og veiðimonnum. ANISA legði størstan dent á at fáa rættindini til grønlendskan sjógv aftur.

Valluttøkan á fólkaatkvøðuni var 74,9% - 47% atkvøddu ja og 53% atkvøddu nei til spurningin, um Grønland skuldi vera partur av EF. Úrslitið hevði virknað frá 1. februar 1985. Eftir atkvøðuúrslitið vendi Grønland sær til donsku stjórnina um eina samráðingarætlan mótvegis EF. Danski uttanríkisráðharrin stóð fyri samráðingunum um at taka Grønland úr, og sendi síðani uppskot til broytingar í EF sáttmálanum til ráðharraráðið í EF. Samráðingarnar um at Grønlandi vildi úr EF vóru harðar og langdrignar. Men eftir at grønlendska heimastýrið gjørdi greitt, at Grønland sjálvt var til reiðar at taka seg úr EF fyri at verja fiskiskapin og ræðisrættin sum heild, var EF noytt til samráðingarborðið[22].

Grønland ynskti OCT (Overseas Country and territories) limaskap, so landið kundi varðveita stuðulin og atgongd til tollfría marknaðin. Grønland vildi ikki koma í somu støðu sum Føroyar, ið hóast lága tollprosentið á 4%, stóð uttanfyri tollfría marknaðin í EF. Danmark stuðlaði Grønlandi, tí danska stjórnin vildi fegin vísa, at hon røkti sína skyldu í ríkisfelagsskapinum.

Týskland hevði gjørt eina risastóra íløgu í sín flota, ið fiskaði uppi við Grønland, og tí legði Týskland sera stórt trýst á EF um at fáa í lag eina fiskiveiðuavtalu við Grønland. Tað var eitt risastórt umdømistap fyri EF, at eitt land meldaði seg úr, og fyri týska fiskiflotan, sum hevði kannað sær stórar mongdir av fiski úr grønlendskum sjógvi, var tað ein fíggjarligur smeitur.

## OCT limaskapur og nýggj fiskiveiðuavtala

Eftir samráðingar bleiv Grønland skrásett sum eitt OCT land, sum í høvuðsheitum merkir, at Grønland fekk tollfría atgongd til evropeiska marknaðin fyri grønlendskar fiskavørur og fleiri stuðulsskipanir, sum góvu landskassanum eina trísiffraða milliónaupphædd árliga[23].

EF kravdi tó, at ein fiskiveiðuavtala fekst í lag, sum stutt sagt snúði seg um, at EF kundi keypa fiskakvotur í grønlendskum sjógvi, ið er eitt tað størsta goymslurúmið í heiminum, har allar fiskivinnutjóðirnar í Evropa gjøgnum mong ár hava heintað stóran part av síni veiðu. Harafturat skuldu vørur úr EF hava framíhjárætt á grønlendska marknaðinum[24]. Fiskiveiðuavtalan skuldi vera galdandi í 5 ár við møguleika fyri at verða longd í 5 ár afturat eftir samráðingar. Fyri rættin at fiska skuldi EF gjalda Grønlandi 216 milliónir krónur árliga. Mótveitingin vóru fiskakvotur

við Grønland, í alt 125.000 tons, har 90.000 tons vóru fiskasløg, sum Grønland ikki gagnnýtti, t.d. svartkjaftur og kongafiskur við eysturstrondina. Um lítið var av fiski, hevði grønlendski fiskiflotin fyrstarætt at fiska sínar kvotur, og flotin hjá EF fekk einki í sín part. EF skuldi kortini gjalda fyri kvoturnar – uttan mun til, um tær vórðu fiskaðar ella ikki[25].

Avtalurnar gjørdu, at EF helt fast við sína støðu sum týdningarmesti samstarvspartnari hjá Grønlandi, eins og evropeiskar fyritøkur kundu vera virknar í vinnumenningini í Grønlandi – ikki minst á ráevnisøkinum[26].



*Eins og í Føroyum, bleiv EF í Grønlandi avmyndað sum ein rovfuglur.*

### Hvat hildu flokkarnir?

Siumut var nøgdur við avtaluna, men bæði Atassut og Inuit Ataqatigiit vóru ónøgdir. Hóast gjaldið frá EF varð mett at verða gott, hildu hesir flokkarnir, at mongdin av fiski, ið EF fekk í sín part, var ov stór. Avtalan skuldi góðkennast í landstinginum. Landstingslimirnir hjá IA atkvøddu ímóti, meðan teir annars so atfinngarsomu limirnir hjá Atassut atkvøddu fyri. Avtalan hevur síðani verið nógv umrødd, tí hon hevur verið mett at vera so góð fyri Grønland. EF hevur í roynd og veru fleiri ferðir goldið fyri kvotur, ið EF ikki hevur fiskað - fyri "pappírsfisk" -og í EF hevur avtalan, ið Grønland fekk, verið kallað "*the worlds most expensive fisheries agreement*"[27].

## Nýggj fiskiveiðuavtala – nýtt samstarv

Grønland hevur í dag í høvuðsheitum tríggjar ymiskar avtalur við ES:

- OCT skipanina og gjøgnum hana atgongd til ymiskar verkætlanir
- Eina fiskiveiðuavtalu
- Eina samstarvsavtalu frá 2007

Samstarvið við ES er í dag víðkað til at fevna um onnur øki eisini. Fiskiveiðuavtalan er ikki nógv broytt, men seinastu avtalurnar hava havt við sær, at ES skip fiska alsamt minni í grønlendskum sjógvi - lutvíst orsakað av støðuni hjá fiskastovnum í Grønlandi, og lutvíst fyri at stuðla grønlendskum fiskiskapi.

12. september 2012 kom nýggjur fiskiveiðusáttmáli í lag millum Grønland og ES. Hann fekk gildi 1. januar 2013 og er galdandi til 21. desember 2015. Tann nýggja fiskiveiðuavtalan býtir fiskiskapin av níggju fiskasløgum ímillum flotan hjá ellivu ES-londum og leggur størsta dentin á burðardyggan fiskiskap. Nýggja fiskiveiðuavtalan gevur grønlendska landskassanum ein hægri vinning enn áður og tekur størri atlit at fiskivinnuni í Grønlandi[28]. Í tíðarskeiðinum 2007-2013 fekk Grønland áleið 320 milliónir krónur árliga frá ES ígjøgnum fiskiveiðu og samstarvsavtaluna. Í dag eru umleið 50 mió. kr. oyramerktar til útbúgvingarøkið[29].

Grønland hevur tó annað samstarv ígjøgnum sín OCT-limaskap. Hetta snýr seg um burðardygga menning av Grønlandi, náttúrutilfeingi, umhvørvi, orku, ferðavinnu, mentan, gransking og matvørutryggleika[30].

# OCT – søguliga gongdin

Fyri at skilja grundarlagið undir OCT-skipanini, mugu vit hyggja eitt sindur aftur í tíðina. Eftir annan veraldarbardaga endaði stórtíðin hjá evropeisku imperialismuni, og EF mátti tíðina eftir hetta finna loysnir og nýggjar skipanir til hjálondini.

Í dag eru fyrrverandi hjálondini býtt í tríggjar bólkar undir ES, og hesir bólkar hava hvørt sítt politiska og búskaparliga tilknýti til ES[31]. Tann størsti bólkurin eru afrikonsk lond sunnan fyri Sahara, Vesturindia og í Kyrrahavsøkinum. Hesi lond eru í dag sjálvstøðug lond, ið ES hevur gjørt serligar menningaravtalur við. Annar bólkurin fevnir um fjarskotnar landspartar, sum í dag eru sameindir við síni hjálandaveldi. Í hesum bólki finna vit t.d. Franskt Guyana og Martinique. Triði bólkurin eru tey í OCT. Hetta eru handanhavs hjálond. Felags fyri hesi londini er, at tey hvørki eru sjálvstøðug lond ella samrunnir partar av hjálandaveldinum, men at tey hava eina meira ella minni umfatandi sjálvstýrisskipan.

OCT bólkurin er skrivaður inn í upprunaligu ROM-traktatina í 1957 . Í dag fevnir hesin bólkurin um eini 25 oyggjar ella oyggjasamfeløg, ið hava tað í felag, at tey eru knýtt til tey fýra ES limalondini Danmark, Frakland, Holland og Stórabretland.

Í mun til hinar báðar bólkarnar eru londini í OCT skipanini í eini rættiliga góðari støðu. OCT londini hava fingið eina góða handils- og tollavtalu. Harafturat fáa OCT londini eisini menningarstuðul, ið er fleiri ferðir hægri fyri hvønn íbúgva enn í miðal fyri afrikonsku londini[32].

Skyldurnar hjá OCT londunum eru rættiliga avmarkaðar, og nevnast kann, at londini ikki skulu seta ES lóggávu í verk, eins og fjarskotnu økini skulu, men OCT londini varðveita kortini síni rættindi sum ES borgarar, hóast londini hvørki eru beinleiðis limalond ella undir ES lóggávu[33].

# Føroyar fara aðra leið

Tá hugsað verður um, at nógv lond og øki, ið hava tøtt stjórnarlig bond við fyrrverandi hjálandaveldini Frakland, Bretland, Holland og Danmark, eru við í OCT skipanini, kann tað tykjast løgið, at Føroyar ikki eisini fóru undir somu skipan, tá Danmark gjørdist limur í ES. Føroyar gjørdust hvørki OCT limur ella sjálvstøðugt land. Hugsa vit um, at Grønland gjørdist OCT limur, kann tað tykjast undrunarvert, at føroyingar ikki so frægt sum kjakaðust um OCT.

Orsøkirnar til tess eru fleiri, og nevnast kann, at Føroyar ongantíð formliga hava havt støðu sum hjáland, eins og Grønland. OCT var upprunaliga ein menningarskipan, og flestu limirnir eru ikki-evropeiskir. Tað var ikki lætt hjá Grønlandi at sleppa í OCT skipanina. Tí kann ein gita seg fram til, at tað allarhelst hevði verið torførari hjá Føroyum. Harafturat hevði Føroyar heimastýri, tá Danmark gjørdist ES limaland, og føroyingar sluppu tí at standa uttanfyri, meðan Grønland ímóti sínum vilja gjørdist partur av ES.

Ein tann størsta orsøkin til at Føroyar ikki eru við í OCT er allarhelst, at politiska ætlanin í Føroyum seinastu mongu árini hevur verið at bøta um viðurskiftini við ES soleiðis, at Føroyar koma meira ájavnt við Noreg og Ísland. OCT-menningarskipanin tykist at vera ein heilt onnur kós.

## Notur

1 Lm.nr. 37/1971: *Felagsmarknaðarmálið*

2 Lm.nr. 6/1971: *Føroyar og europeiski felagsskapurin*.

3 Lm.nr. 6/1971: *Føroyar og europeiski felagsskapurin*.

4 Fjúrtandi September, 4. november 1970.

5 Sosialurin, 2. desember 1970.

6 Fólkafylkingin móti EF: Føroyar og *EF*, Tórshavn 1971.

7 Lm.nr. 6/1971: *Føroyar og europeiski felagsskapurin*.

8 Rapport fra Embedsmandsudvalget vedrørende Færøernes stilling til De europæiske Fællesskaber, 1970.

9 Løgtingstíðindi 1970 kapittul 6, síða 114.

10 Lm.nr. 6/1971: *Føroyar og europeiski felagsskapurin*.

11 Lm.nr. 37/1971: *Felagsmarknaðarmálið*

12 Dagblaðið 29. januar 1972.

13 Fráðgreiðing løgmans á ólvsøku 1972.

14 Uppskot til samtyktar 7. desember 1972.

15 Henrik Skydsbjerg, (1984): *20 år med hjemmestyre*, s 25.

16 Sermitsiaq 1. okt. 2012: "*40-årsdagen for Grønlands nej til EF"* af Kurt Kristensen.

17 Hans Jacob Helms. *EF holder hånden over torsketyvene*, í Christiansen & Bønnelykke (1981). Grønland på vej. Udgivet av folkebevægelsen mod EF.

18 Lars Emil Johansen. *Vi kan og vil selv*, í Christiansen & Bønnelykke (1981). Grønland på vej. Udgivet av folkebevægelsen mod EF.

19 Finn Lynge: *Vi vil ikke fjernstyres fra Bruxelles*, í Christiansen & Bønnelykke (1981). Grønland på vej. Udgivet av folkebevægelsen mod EF.

20 Hans Jacob Helms. *EF holder hånden over torsketyvene*, í Christiansen & Bønnelykke (1981). Grønland på vej. Udgivet av folkebevægelsen mod EF.

21 Skovman, Sven. *Når tilskud bruges som propaganda*, í Christiansen & Bønnelykke (1981). Grønland på vej. Udgivet av folkebevægelsen mod EF.

22 Birgitte Garvgaard (2006), *Grønland som udenrigspolitisk aktør*.

23 Sermitsiaq 1. okt. 2012 "*40-årsdagen for Grønlands nej til EF*" af Kurt Kristensen.

24 Henrik Skydsbjerg (1984). *20 år med hjemmestyre*.

25 Birgitte Gravgaard, 2006: *Grønland som udenrigspolitisk aktør.*

26 Henrik Skydsbjerg (1984), *20 år med hjemmestyre*.

27 Junker Mortensen 1996:204: í Gravgaard, Birgitte (2006). Speciale. *Grønland som udenrigspolitisk aktør.*

28 www.fiskerforum.dk/erhvervsnyt/erhvervsnyhed.asp?nyId=3080.

29 Udenrigspolitisk redegørelse 2012.

30 http://ec.europa.eu/europeaid/where/octs_and_greenland/countries/greenland_en.htm.

31 Gad et al, 2001. *Arktis: suverænitet, styring*, geopolitik i Politik, nr. 1: årgang 14: 2011. Jurist- og økonomforbundets forlag, s 15.

32 Pram et al. TIDSKRIFTET POLITIK nr. 1: årgang 14: 2001 s 16.

33 http://eeas.europa.eu/oct/index_en.htm.




**Fyri 40 árum síðani** søgdu føroyingar eitt rungandi "Nei til EEC". Tað var rætt tá. Men umstøðurnar broytast. Tíðin er komin til - so ella so - at siga "Ja til Evropa".

At standa uttanfyri avmarkar okkara menningarmøguleikar. Og tekur Ísland síðsta stigið heilt innum, kunnu Føroyar verða púra avbyrgdar.

Sum eitt lítið fiskivinnuland er okkara støða ikki løtt. Men tað hjálpir ikki at stinga høvdið í sandin.

Við hesi bók vil Javnaðarflokkurin á Fólkatingi seta gongd á eitt neyðugt kjak um okkara støðu til ES.

- Greitt verður frá politisku gongdini, sum hevði við sær, at Føroyar endaðu uttanfyri EF.
- Innlit verður givið í treytir og møguleikar hjá Álandi í ES.
- Argumentini fyri og ímóti íslendskum limaskapi verða løgd fram.
- Grønlendsku royndirnar verða lýstar.
- Mett verður um tær grundgevingar, sum í Føroyum verða brúktar ímóti limaskapi.

Bókin vísir, at føroyskur limaskapur hevur avbjóðingar við sær. Men hann gevur eisini møguleikar. Og at standa uttanfyri kann gerast tað truplasta av øllum.